Bíblian

HVØR ER BOÐSKAPURIN?

Bíblian

HVØR ER BOÐSKAPURIN?

INNIHALD

Partur

1 Skaparin gevur menniskjanum eitt paradís [síða 4]

2 Paradísið verður mist [síða 5]

3 Mannaættin yvirlivir Vatnflóðina [síða 6]

4 Gud ger ein sáttmála við Ábraham [síða 7]

5 Gud signar Ábraham og familju hansara [síða 8]

6 Job varðveitir sakloysi sítt [síða 9]

7 Gud fríar synir Ísraels [síða 10]

8 Ísraelsmenn fara inn í Kána'an [síða 11]

9 Ísraelsmenn vilja hava ein kong [síða 12]

10 Sálomo stjórnar við vísdómi [síða 13]

11 Innblástir sangir, sum ugga og læra [síða 14]

12 Lívsvísdómur frá Gudi [síða 15]

Partur

13 Góðir kongar og óndir kongar [síða 16]

14 Gud talar til fólkið við profetum sínum [síða 17]

15 Ein profetur í útlegd sær inn í framtíðina [síða 18]

16 Messias kemur [síða 19]

17 Jesus lærir onnur um Guds ríki [síða 20]

18 Jesus ger undur [síða 21]

19 Jesus kemur við eini víðfevndari profeti [síða 22]

20 Jesus Kristus verður dripin [síða 23]

21 Jesus livir! [síða 24]

22 Ápostlarnir boða óttaleysir [síða 25]

23 Tey góðu tíðindini verða borin út [síða 26]

24 Paulus skrivar til samkomurnar [síða 27]

25 Leiðbeining um trúgv, atburð og kærleika [síða 29]

26 Aftur eitt paradís! [síða 30]

Henda útgávan er ikki til sølu. Hon er framleidd sum liður í einum heimsumfatandi bíbliuundirvísingararbeiði, ið verður fíggjað við sjálvbodnum stuðli.

Far inn á www.jw.org, um tú vilt lata stuðul.

Stendur einki annað viðmerkt, eru bíbliuorðini eftir umseting Victor Danielsens, endurskoðaðu útgávuni 1974. © Hin Føroyski Bíbliugrunnurin.

The Bible—What Is Its Message?
Prentað í november 2016

Faroese (*bm*-FR)

© 2009
WATCH TOWER BIBLE AND TRACT SOCIETY OF PENNSYLVANIA

Útgevarar:
Jehova vitni

Hví kanna Bíbliuna?

Kennir tú Bíbliuna? Hon er eitt einastandandi verk og tann bókin, sum hevur størstu útbreiðslu í søguni. Boðskapurin í Bíbliuni hevur givið fólki úr øllum mentanum ugga og vón, og tey eru komin eftir, at ráðini í Bíbliuni eru hent í gerandisdegnum. Kortini vita nógv nú á døgum ikki so nógv um Bíbliuna. Óansæð um tú ert trúgvandi ella ikki, so hevur tú kanska hug at vita nakað um hana. Endamálið við hesum heftinum er at geva tær eitt yvirlit yvir Bíbliuna.

ÁÐRENN tú letur eina bíbliu upp og fert at lesa í henni, er tað gott at vita eitt sindur um, hvussu hon er skipað. Bíblian, ið eisini er kend sum Halgabók, er í veruleikanum eitt savn við 66 bókum. Tað byrjar við Fyrstu Mósebók og endar við Opinberingini.

Hvør er høvundur Bíbliunnar? Tað er ein spennandi spurningur. Umleið 40 menn skrivaðu Bíbliuna í einum 1600 ára longum tíðarskeiði. Tað er áhugavert, at hesir menn ikki hildu uppá, at teir vóru høvundar Bíbliunnar. Ein teirra skrivaði: „Øll skriftin er innblást av Gudi.“ (2 Timoteus 3:16) Og ein annar segði: „Andi [Jehova] talar í mær, orð Hansara eru á tungu míni.“ (2 Sámuelsbók 23:2) Sostatt hildu bíbliuskrivararnir fast uppá, at Jehova Gud, alheimsins Fullveldisharri, er høvundur Bíbliunnar. Tað skilst av skriftum teirra, at Gud fegin vil hava tætt samband við menniskjuni.

Nakað annað, sum eisini er umráðandi fyri at skilja Bíbliuna, er, at innblásta skriftin hevur eitt gjøgnumgangandi tema: at hevda, at Gud við himmalska ríki sínum hevur rættin at stjórna mannaættini. Á komandi síðunum fært tú at síggja, hvussu temaið fer sum ein reyður tráður ígjøgnum alla Bíbliuna, úr Fyrstu Mósebók til Opinberingina.

Við øllum hesum í huga, fara vit nú at kanna boðskapin í heimsins best umtóktu bók, Bíbliuni.

HENTAR UPPLÝSINGAR UM BÍBLIUNA

- Hon varð skrivað í einum 1610 ára longum tíðarskeiði, frá 1513 f.o.t. til 98 e.o.t.*
- Tær fyrstu 39 bøkurnar — fyri tað mesta skrivaðar á hebraiskum og nakrar fáar á aramaiskum — eru kendar sum Hebraisku skriftirnar ella „Gamla testamenti“.
- Tær síðstu 27 bøkurnar — skrivaðar á grikskum — eru kendar sum Kristnu griksku skriftirnar ella „Nýggja testamenti“.
- Bíblian er býtt sundur í kapitlar og ørindi. Til dømis vísir Matteus 6:9, 10 til kapittul 6 í evangeliinum eftir Matteus, ørindi 9 og 10.

* Ymiskir mátar eru at nevna tíðarfesting uppá. Í hesum heftinum merkir e.o.t. „eftir okkara tíðarrokning“ og f.o.t. „fyri okkara tíðarrokning“. Tað sært tú á tíðarlinjuni niðast á síðunum.

• 1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin



1 Skaparin gevur menniskjanum eitt paradís

Gud skapar fysiska alheimin og lívið á jørðini; hann skapar ein fullkomnan mann og eina fullkomna kvinnu, gevur teimum ein vakran urtagarð og áleggur teimum at vera honum lýðin

ORÐINI: „Í upphavi skapti Gud himmal og jørð,“ er kendasti inngangurin, ið nakrantíð er skrivaður. (1 Mósebók 1:1) Við hesum einfalda og tignarliga setninginum verða vit kunnað um týdningarmiklasta persónin í Heilagu skriftini — Jehova Gud hin alvalda. Fyrsta ørindið í Bíbliuni sigur okkum, at tað er Gud, sum hevur skapt víðfevnda fysiska alheimin, og altso eisini gongustjørnuna, vit búgva á. Tey næstu ørindini greiða frá, at Gud í eini rød av longum tíðarskeiðum, ímyndarliga nevnd dagar, fór í holt við at gera jørðina til reiðar til bústað hjá okkum og skapa øll undrini í náttúruni.

Tað mest stórsligna, Gud skapti á jørðini, var menniskjað. Her var ein skapningur, skaptur í Guds mynd — sum var førur fyri at endurspegla eginleikarnar hjá Jehova, til dømis hansara kærleika og vísdóm. Gud skapti menniskjað úr moldini í jørðini. Hann gav honum navnið Ádam og setti hann í eitt paradís — í urtagarðin Eden. Gud plantaði sjálvur henda urtagarðin við vøkrum, fruktagóðum trøum.

Gud sá, at menniskjað hevði tørv á einum maka. Av einum rivi frá Ádami skapti Gud tí eina kvinnu, sum seinni fekk navnið Eva, og leiddi hana til mannin at vera kona hansara. Ádam varð glaður og segði skaldsliga: „Hesa ferð er tað bein av mínum beinum og hold av mínum holdi!“ Gud greiddi frá: „Tí fer maðurin frá faðir og móður og heldur seg til konu sína, og tey bæði verða eitt hold.“ — 1 Mósebók 2:22-24; 3:20.

Gud gav Ádami og Evu tvey boð. Tað fyrsta boðið var, at tey skuldu dyrka jørðina og røkja hana, og við tíðini skuldu tey fylla hana við sínum avkomi. Seinna boðið var, at tey ikki máttu eta av einum ávísum træi í hesum risastóra urtagarðinum, nevniliga „trænum til kunnskap um gott og ilt“. (1 Mósebók 2:17) Vóru tey ólýðin, fóru tey at doyggja. Við hesum boðum gav Gud manninum og kvinnuni høvi at vísa, at tey viðurkendu hann sum stjórnara. Við sínum lýdni kundu tey eisini vísa, at tey elskaðu Gud og vóru honum takksom. Tey høvdu alla orsøk til at viðurkenna Guds góðu stjórn. Hesi fullkomnu menniskjuni høvdu eingi lýti. Bíblian sigur: „Gud sá alt tað, ið Hann hevði gjørt — og tað var sera gott.“ — 1 Mósebók 1:31.

— Grundað á Fyrstu Mósebók, kapittul 1 og 2.

■ Hvussu lýsir Bíblian skapan menniskjanna og bústað teirra á jørðini?

■ Hvat lív gav Gud manninum og kvinnuni møguleika at fáa?

■ Hvørji boð gav Gud fyrsta menniskjaparinum?

NAVN GUDS

Í Heilagu skriftini verður Gud nevndur við ymiskum heitum, slík sum Skaparin og hin Alvaldi. Summi heiti leggja dent á eginleikar Guds, til dømis hansara heilagleika, hansara makt, hansara rættvísi, hansara vísdóm og hansara kærleika. Gud hevur kortini givið sær sjálvum eitt einastandandi persónsnavn — *Jehova.* Á teimum málunum, Bíblian upprunaliga varð skrivað á, stóð Guds navn umleið 7000 ferðir, og fyrstu ferð í Fyrstu Mósebók 2:4. Navnið Jehova merkir „hann letur (fær til at) blíva“. Tað er gott at vita, tí tað merkir, at Gud kann fremja eina og hvørja ætlan, sum hann hevur í huga, og halda eitt og hvørt lyfti, sum hann gevur.

2 Paradísið verður mist

Ein uppreistrarhugaður eingil fær fyrsta mannin og fyrstu kvinnuna, Ádam og Evu, at vraka Guds stjórn. Úrslitið verður, at synd og deyði koma inn í heimin

LANGT áðrenn Gud skapti menniskjuni, hevði hann skapt nógvar ósjónligar andaskapningar — einglar. Í Eden royndi ein uppreistrarhugaður eingil, sum bleiv kendur sum Satan Djevulin, við snildi at freista Evu at eta av einasta trænum, sum Gud hevði sagt, at tey ikki máttu eta av.

Við einari slangu sum málgagn segði Satan óbeinleiðis, at Gud noktaði kvinnuni og manninum nakað gott. Eingilin segði við Evu, at hon og maður hennara *ikki* skuldu doyggja, um tey ótu av bannaðu fruktini. Soleiðis legði Satan Gud undir at lúgva fyri menniskjabørnunum. Hesin svíkjarin royndi at fáa ólýdni móti Gudi at virka sum nakað dámligt, ið kundi geva serligan kunnskap og frælsi. Men alt var lygn — satt at siga fyrsta lygnin, ið nakrantíð var borin fram á jørðini. Í veruleikanum snúði tað seg um Guds fullveldi ella yvirvald — altso um Gud hevur rættin at ráða, og um hann útinnir sítt vald rættvíst, sínum tegnum at gagni.

Eva trúði lygnini, ið Satan bar fram. Hon fór at girnast fruktina á trænum og át so av henni. Seinni gav hon manni sínum burturav, og hann át eisini. Soleiðis gjørdust tey syndarar. Henda gerðin, sum tóktist hava lítið upp á seg, var í veruleikanum ein uppreistur. Tá Ádam og Eva vitandi og við vilja vóru Gudi ólýðin, vendu tey Skapara sínum bakið, hóast hann hevði givið teimum alt, eisini eitt fullkomið lív.

Gud kravdi uppreistrarfólkini til svars fyri gerðir teirra. Hann boðaði frá, at tað lovaða avkomið, ella frelsarin, skuldi koma og beina fyri Satani, ið hevði brúkt slanguna sum málgagn. Gud læt útinnanina av deyðadóminum yvir Ádam og Evu bíða eina tíð og vísti soleiðis óføddu børnum teirra miskunn. Hesi børnini høvdu nú grundarlag fyri vón, tí tann, sum Gud fór at senda, skuldi bøta tær syrgiligu avleiðingarnar av uppreistrinum í Eden. Júst hvussu Guds ætlan viðvíkjandi hesum komandi frelsaranum fór at ganga út — og hvør tað fór at vera — varð opinberað so við og við, sum bøkurnar í Bíbliuni vórðu skrivaðar.

Avkomið „skal sora høvdið á tær, men tú skalt høgga Hann í hælin“.
— 1 Mósebók 3:15

Gud rak Ádam og Evu út úr Paradísinum. Tað fór at krevja stríð og strev at liva av at dyrka jørðina uttan fyri urtagarðin Eden. Eva gjørdist við barn og átti Káin, fyrsta barnið hjá Ádami og henni. Tey fingu eisini onnur børn, synir og døtur, harímillum Ábel og Set, ættarfaðir Nóa.

— Grundað á Fyrstu Mósebók, kapittul 3 til 5; Opinberingina 12:9.

- Hvør var fyrsta lygnin, og hvør kom við henni?
- Hvussu mistu Ádam og Eva Paradísið?
- Hvørja vón gav Gud, tá hann kravdi uppreistrarfólkini til svars fyri gerðir teirra?

ÓFULLKOMILEIKI OG DEYÐI

Gud skapti Ádam og Evu fullkomin, við útliti til at liva æviga í Paradísinum. Tá tey gjørdu uppreistur móti Gudi, syndaðu tey. Ádam og Eva mistu soleiðis fullkomileikan og kvettu sambandið við keldu lívsins, Jehova. Eftir hetta kundu tey og ófullkomnu eftirkomarar teirra ikki sleppa undan syndini og at enda deyðanum.
— Rómbrævið 5:12.

1 Mósebók •
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin

• 1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv

3 Mannaættin yvirlivir Vatnflóðina

Gud oyðileggur ein óndan heim, men bjargar Nóa og familju hansara

SO hvørt sum menniskjuni gjørdust fleiri og fleiri á jørðini, tóku bæði óndskapur og synd skjótt um seg. Ein profetur, sum æt Enok, var kanska tann einasti, sum tá í tíðini tænti Jehova og ávaraði um, at Gud einaferð fór at forkoma teimum gudleysu. Kortini treivst óndskapurin, og viðurskiftini versnaðu alsamt. Nakrir einglar gjørdu uppreistur ímóti Jehova, tá teir rýmdu úr staði sínum í himli og við girndarhuga fóru niður á jørðina í mannalíki at fáa sær konur. Úrslitið av hesum ónatúrligu hjúnabondunum var, at eftirkomararnir gjørdust ráðaríkir risar, róptir nefilim, sum øktu um harðskapin og tann blóðuga yvirgangin í heiminum. Gud kendi seg illa særdan av at síggja skapanarverkið hjá sær á jørðini verða oyðilagt.

Eftir deyða Enoks var ein maður, sum líktist burturúr í hesum ónda heiminum. Hann æt Nóa. Hann og familja hansara royndu at gera tað, sum var rætt í eygum Guds. Tá Gud gjørdi av at forkoma teimum óndu menniskjunum, ætlaði hann at bjarga Nóa og dýralívinum á jørðini. Tí bað Gud hann byggja eina ørk — eitt risastórt fýrakantað far. Í hesum farinum kundu Nóa og familja hansara verða bjargað saman við nógvum dýrasløgum í eini komandi heimsumfatandi vatnflóð. Nóa gjørdi, sum Gud vildi. Tey áratíggjuni, hann bygdi ørkina, var hann eisini ein 'prædikari rættvísinnar'. (2 Pætur 2:5) Hann ávaraði um komandi vatnflóðina, men fólk lótu ikki við seg koma. Tíðin kom, tá Nóa og familja hansara skuldu fara inn í ørkina við øllum dýrunum. Tá tey vóru komin inn, læt Gud hurðina aftur, og tað fór at regna.

Tað oysti niður í 40 dagar og 40 nætur, til øll jørðin var undir. Tey óndu vóru nú burtur. Mánaðir seinni, tá vatnið var minkað nakað, legði ørkin seg á eitt fjall. Tá tey ferðandi trygg kundu fara út úr ørkini, høvdu tey verið umborð í eitt heilt ár. Takksamur gav Nóa Jehova eitt offur, og sum svar lovaði Jehova Nóa og familju hansara, at hann aldri aftur skuldi forkoma øllum livandi á jørðini í einari vatnflóð. Hann setti ælabogan á himmalin sum eitt sjónligt prógv um hetta, eina áminning um tað uggandi lyftið.

Eftir Vatnflóðina gav Gud eisini mannaættini nøkur nýggj boð. Hann loyvdi teimum at eta dýrakjøt, men forbjóðaði teimum at eta blóð. Eisini gav hann eftirkomarunum hjá Nóa boð um at spjaðast á jørðini, men nøkur av teimum vóru ólýðin. Fólk savnaðu seg undir einum leiðara, sum æt Nimrod, og fóru at byggja eitt stórt torn í býnum Bábel, sum seinni fekk navnið Bábylon. Endamálið hjá teimum var at treiskast ímóti boðnum frá Gudi um at spjaða seg um alla jørðina. Men Gud forðaði ætlanunum hjá teimum uppreistrarhugaðu við at blanda málini hjá teimum og fáa tey at tosa ymisk mál. Tá tað ikki longur bar til hjá teimum at samskifta, sleptu tey verkætlanini og spjaddust.

— Grundað á Fyrstu Mósebók, kapittul 6 til 11; Judas 14, 15.

■ Hvussu spjaddist óndskapurin á jørðini?

■ Hvussu vísti Nóa, at hann var ein trúfastur maður?

■ Hvat forboð gav Gud mannaættini eftir Vatnflóðina?

TEIR LIVDU VIÐ GUDI

Teir flestu eftirkomararnir hjá Ádami og Evu vrakaðu harradømi Jehova. Kortini vóru undantøk, og tað fyrsta var Ábel, trúfasti sonur teirra. Seinni lesa vit, at bæði Enok og Nóa livdu við Gudi, tað merkir, at teir hildu eina kós, sum gleddi Jehova. (1 Mósebók 5:22; 6:9) Ein stórur partur av Bíbliuni snýr seg um menn og kvinnur, sum á líknandi hátt valdu Gud sum stjórnara.

4 Gud ger ein sáttmála við Ábraham

Í trúgv er Ábraham Gudi lýðin, og Jehova lovar at signa hann og geva honum nógvar eftirkomarar

UMLEIÐ 350 ár vóru liðin síðan vatnflóðina á Nóa døgum. Ættarfaðirin, Ábraham, búði í blómandi býnum Ur, í tí sum nú á døgum nevnist Irak. Ábraham var ein maður, ið hevði eina óvanliga trúgv. Men nú varð trúgv hansara roynd.

Jehova bað Ábraham fara úr heimlandi sínum og flyta til eitt fremmant land, sum vísti seg at vera Kána'an. Ábraham ivaðist onga løtu, men gjørdi, sum Gud vildi og fór við øllum húski sínum, harímillum konuni Sáru og bróðursoninum Lot. Eftir longu ferðina fór hann at búgva í tjøldum í Kána'anslandi. Í einum sáttmála við Ábraham lovaði Jehova at gera hann til eitt stórt fólk, at allar ættir á jørðini skuldu verða signaðar við honum, og at eftirkomarar hjá honum skuldu taka Kána'ansland í ogn.

Ábraham og Lot vórðu ríkir og fingu sær hópin av seyða- og neytafylgjum. Ósjálvsøkin læt Ábraham Lot velja, hvat øki hann vildi hava. Lot valdi tað fruktagóða økið á Jordanslættanum og búsetti seg nærindis býnum Sodoma. Menninir í Sodoma vóru kortini siðloysingar og framdu grovar syndir ímóti Jehova.

Seinni tryggjaði Jehova Gud Ábrahami, at eftirkomarar hansara skuldu blíva sum stjørnurnar í tali. Ábraham trúði hesum lyftinum, men elskaða kona hansara, Sára, varð barnleys við sama lag. Tá hann so var vorðin 99 ára gamal, og Sára nærkaðist teimum 90, segði Gud við hann, at hann og Sára fóru at fáa ein son. Sum Gud hevði lovað, átti Sára sonin Ísak. Ábraham fekk eisini onnur børn, men tað skuldi vera gjøgnum Ísak, at frelsarin, sum lyfti varð givið um í Eden, skuldi koma.

Lot og familja hansara búðu nú í Sodoma, men hin rættvísi Lot tók ikki eftir teimum siðleysu íbúgvunum í býnum. Tá Jehova gjørdi av at útinna dóm sín yvir Sodoma, sendi hann frammanundan einglar at ávara Lot um komandi oyðingina. Einglarnir heittu inniliga á hann og familju hansara um at flýggja úr býnum og ikki hyggja aftur um seg. Síðani læt Gud svávul og eld regna yvir Sodoma og tann gudleysa býin Gomorra, sum lá nærindis, og oyddi allar íbúgvarnar. Lot og døtur hansara vórðu bjargað. Men kona Lot hugdi aftur um seg, kanska tí hon saknaði tað, hon var farin frá. At hon var ólýðin, kostaði henni lívið.

— *Grundað á Fyrstu Mósebók 11:10–19:38.*

- Hví flutti Ábraham til Kána'ansland?
- Hvønn sáttmála gjørdi Jehova við Ábraham?
- Hví oyðilegði Jehova Sodoma og Gomorra?

EIN GUD, SUM GER SÁTTMÁLAR

Á Bibliunnar døgum var ein sáttmáli ein formlig avtala. Við eini røð av sáttmálum ella hátíðarligum lyftum opinberaði Jehova so við og við, hvussu hann fór at fremja sína ætlan viðvíkjandi frelsaranum, sum lyfti varð givið um í Eden. Sáttmálin við Ábraham vísti, at hann, ið Gud hevði givið lyfti um, skuldi koma í ætt Ábrahams. Seinni skuldu aðrir sáttmálar gera greitt, hvør hann var.

1 Mósebók •
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin

• 1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin



5 Gud signar Ábraham og familju hansara

Eftirkomarar Ábrahams hava framgongd.
Gud verjir Jósef í Egyptalandi

JEHOVA visti, at tann dýrabarasti, hann átti, ein dag skuldi líða og doyggja. Tað var tann sannleikan, profetiin í Fyrstu Mósebók 3:15 óbeinleiðis sipaði til. Kundi Gud á nakran hátt gera menniskjum greitt, hvussu nógv hetta ofrið fór at kosta honum? Í Bíbliuni er ein livandi lýsing av hesum. Hon varð givin, tá Gud bað Ábraham ofra elskaða son sín, Ísak.

Ábraham hevði sterka trúgv. Minst til, at Gud hevði lovað honum, at fyriboðaði frelsarin, ella lovaða avkomið, skuldi koma úr ætt Ísaks. Í áliti á at Gud, um neyðugt, fór at reisa Ísak upp aftur, var Ábraham í lýdni fúsur at ofra sín egna son. Men ein eingil frá Gudi steðgaði Ábrahami í síðstu løtu. Gud rósti tí trúfasta ættarfaðirinum fyri, at hann var fúsur at ofra tað dýrabarasta hann átti, og endurtók lyfti síni til hansara.

Seinni fekk Ísakur tveir synir, Esau og Jákup. Í mun til Esau virðismetti Jákup tað andaliga, og tað fekk hann løn fyri. Gud broytti navnið hjá Jákupi til Ísrael, og teir 12 synirnir hjá Ísrael gjørdust høvdingar fyri ættir Ísraels. Men hvussu bleiv henda familjan til eina stóra tjóð?

Ein røð av hendingum byrjaði, tá teir flestu synirnir hjá Jákupi gjørdust øvundsjúkir inn á lítlabeiggjan, Jósef. Teir seldu hann sum træl, og hann varð førdur til Egyptalands. Men Gud signaði henda trúfasta og djarva unga mannin. Jósef hevði harðan mótgang, men at enda gav Farao, sum ráddi í Egyptalandi, honum kortini heiður og stórt vald. Hetta hendi júst í røttu tíð, tí ein hungursneyð fekk Jákup at senda nakrar av synum sínum til Egyptalands at keypa mat — og tað vísti seg, at Jósef nú var tann, ið hevði ábyrgdina av øllum matgoymslunum! Eftir at Jósef á ógvusligan hátt var sameindur aftur við angrandi brøður sínar, fyrigav hann teimum og syrgdi fyri, at øll familjan kundi flyta til Egyptalands. Tey fingu eitt tað besta landøkið í ogn, har tey kundu trívast og hava framgongd. Jósef skilti, at Gud hevði lagað alt soleiðis fyri at halda síni lyfti.

Jákup eldist og livdi síðstu tíð sína í Egyptalandi við vaksandi familju síni rundan um seg. Tá hann lá at doyggja boðaði hann frá, at lovaða avkomið ella frelsarin skuldi vera ein máttmikil stjórnari, sum skuldi føðast í ætt sonar hansara, Juda. Nógv ár seinni, áðrenn deyða sín, profeteraði Jósef, at Gud ein dag fór at leiða familjuna hjá Jákupi út úr Egyptalandi.

— Grundað á Fyrstu Mósebók, kapittul 20 til 50; Hebrearabrævið 11:17-22.

■ Hvat bað Gud Ábraham gera, og hvat gjørdi hann soleiðis menniskjunum greitt?

■ Hvussu kom Jósef til Egyptalands, og hvat hevði tað við sær?

■ Hvørja profeti bar Jákup fram, áðrenn hann doyði?



6 Job varðveitir sakloysi sítt

Satan setir spurnartekn við sakloysi Jobs fyri Gudi, men Job verður verandi trúfastur

HEVÐI nakað menniskja verið verandi trúfast móti Gudi, um tað varð roynt til tað ítasta, og lýdnið ikki tóktist geva nakrar materiellar fyrimunir? Hesin spurningurin varð reistur — og svaraður — í samband við ein mann, ið kallaðist Job.

Meðan ísraelsmenn enn vóru í Egyptalandi, búði Job, ein skyldmaður hjá Ábrahami, í tí landi, sum nú á døgum kallast Arabia. Um ta tíðina stigu einglarnir fram fyri Gud í himli, millum teirra var eisini tann uppreistrarhugaði Satan. Fyri hesum himmalska skaranum segði Gud, hvussu stórt álit hann hevði á trúfasta tænara sínum Job. Í veruleikanum segði Jehova, at einki annað menniskja var so sakleyst sum Job. Men Satan helt uppá, at Job bara tænti Gudi, tí Gud hevði signað og vart hann. Ja, Satan vildi vera við, at um Job misti alt, ið hann átti, fór hann at banna Gudi.

Gud loyvdi Satani at ráma Job, so hann fyrst misti ríkidømi sítt og børn síni og síðani gjørdist sjúkur. Av tí at Job ikki visti, hvønn leiklut Satan hevði í øllum hesum, skilti hann ikki, hví Gud læt hann fáa so nógvar trongdir oman yvir seg. Men kortini vendi Job ongantíð Gudi bakið.

Tríggir falskir vinir komu til Job. Í eini rød av talum, sum fylla nógvar síður í Jobs bók, royndu menninir av órøttum at sannføra Job um, at Gud revsaði hann fyri duldar syndir. Ja, teir hildu eisini uppá, at Gudi hvørki dámar tænarar sínar ella hevur álit á teimum. Job vísti skeivu hugsanum teirra burtur. Sannførdur segði hann, at hann skuldi verða sakleysur til deyðan!

Men Job fór skeivur, tá hann hugsaði alt ov nógv um at rættvísgera seg sjálvan. Elihu, ein yngri maður, sum hevði lurtað eftir øllum orðaskiftinum, segði sína hugsan. Hann fanst at Job fyri ikki at hava skilt, at tað hevði nógv størri týdning at verja fullveldi Jehova Guds, enn at rættvísgera seg sjálvan. Harafturat gav Elihu følsku vinum Jobs eina harða átalu.

Síðani talaði Jehova við Job og rættaði hugsunarhátt hansara. Hann vísti á nógv undur í skapanarverkinum og lærdi soleiðis Job, hvussu lítið menniskjað er í mun til Gud. Job tók eyðmjúkur átaluna til sín. Jehova, sum er „sára náðiríkur og miskunnsamur“, læt Job fáa heilsuna aftur, gav honum tvífalt aftur av ríkidøminum, hann hevði áður, og signaði hann við tíggju børnum. (Jákup 5:11) Job varðveitti sakloysi sítt og vísti soleiðis ákæruni frá Satani aftur, um at eingi menniskju verða verandi trúføst móti Gudi, um tey verða roynd.

— *Grundað á Jobs Bók.*

■ Hvønn spurning setti Satan í samband við Job?

■ Hvat varð prógvað, tá Job varðveitti sakloysi sítt fyri Jehova?

TEIR TÝÐANDI STRÍÐSPURNINGARNIR

Tá ið Satan helt uppá, at Job, sum var tann mest trúfasti og gudsóttandi maðurin á jørðini í síni samtíð, bara tænti Jehova av sjálvgóðsku, legði hann óbeinleiðis allar skilagóðar skapningar undir tað sama. Satan gjørdi soleiðis menniskjans sakloysi fyri Gudi til eitt ivamál. Hetta er ein partur av stóra stríðspurninginum, sum Satan reisti í Eden, nevniliga um tað er av røttum, Jehova hevur fullveldið, og um hann útinnir tað rættvíst. Jobs Bók vísir, at Guds skapningar kunnu gera sítt til at staðfesta Jehova fullveldi við at varðveita sakloysi sítt fyri honum.

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin

1 Mósebók
• 2 Mósebók
• 3 Mósebók
• 4 Mósebók
• 5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv

7 Gud fríar synir Ísraels

Jehova slær Egyptaland við plágum, og Móses leiðir ísraelsmenn út haðani. Gud gevur Ísrael Lógina við Mósesi

ÍNÓGV ár búðu synir Ísraels í Egyptalandi; tað gekst teimum sera væl, og teir vuksu í tali. Men so fekk ein nýggjur farao valdið. Hesin valdsharrin kendi ikki Jósef. Hann var ein óndur harðræðisharri og óttaðist ísraelsmenn, tí teir vóru blivnir so ovurhonds nógvir. Tí gjørdi hann teir til trælir og gav boð um, at øll nýfødd dreingjabørn skuldu druknast í Nilánni. Men ein djørv mamma vardi lítla son sín, legði hann í eina kurv og fjaldi hana í sevinum við áarbakkan. Dóttir Farao fann dreingin, gav honum navnið Móses og aldi hann upp í egyptiska kongshúsinum.

Tá Móses var 40 ára gamal, kom hann illa fyri, tí hann vardi ein ísraelskan træl móti einum egyptiskum arbeiðsfúta. Móses flýddi til eitt fjart land og búði í útlegd. Tá Móses var 80 ára gamal, sendi Jehova hann aftur til Egyptalands, har hann skuldi stíga fram fyri Farao og krevja, at Guds fólk varð fríað.

Farao segði kortanei, og Gud læt tí tíggju plágur koma yvir Egyptaland. Hvørja ferð Móses kom fram fyri Farao fyri at geva honum møguleika at forða næstu pláguni, gjørdi Farao seg harðan og vanvirdi Móses og Gud hansara, Jehova. At enda førdi tíggjunda plágan deyða yvir øll frumborin í landinum — uttan í teimum húskjunum, har fólkini høvdu verið Gudi lýðin og smurt blóð frá einum offurlambi á durastavirnar. Eingilin, sum Gud hevði sent at drepa tey frumbornu, leyp hesi húsini um. Ísraelsmenn mintust síðani hvørt ár hesa undursomu frían við at halda eina høgtíð, nevnd páskir.

Eftir at Farao hevði mist sín egna frumborna son, bað hann Móses og allar ísraelsmenn fara úr Egyptalandi. Teir skipaðu alt fyri eitt fyri burturferðini. Men Farao hálsaði um og legði eftir teimum við nógvum monnum og vagnum. At síggja til vóru ísraelsmenn fangaðir á strondini við Reyðahavið. Tá kleyv Jehova Reyðahavið, so ísraelsmenn kundu fara tvørturum á turrum, meðan sjógvurin stóð sum ein múrur á báðum síðum. Egyptar hildu eftir teimum, men Gud læt sjógvin oysa oman yvir Farao og her hansara, so teir druknaðu.

Seinni, tá ísraelsmenn høvdu legu sína við Sinaifjall, gjørdi Jehova ein sáttmála við teir. Við Mósesi sum millummanni gav Gud ísraelsmonnum nakrar lógir, sum kundu leiðbeina og verja teir á so at siga øllum lívsins økjum. So leingi sum Ísrael trúfast gav seg undir leiðslu Jehova, fór hann at vera við teimum og lata tjóðina vera øðrum til signing.

Teir flestu av ísraelsmonnum vístu kortini skuffandi lítla trúgv á Gud. Tí læt Jehova hetta ættarliðið ganga um í oyðimørkini í 40 ár. Móses útnevndi so tann heiðurliga mannin, Josva, til eftirmann sín. Umsíðir var Ísraels fólk til reiðar at fara inn í landið, sum Gud hevði lovað Ábrahami.

— Grundað á Aðru til Fimtu Mósebók; Sálm 136:10-15; Ápostlasøguna 7:17-36.

■ Hvussu gjørdist Móses tann, ið Gud brúkti at fría Ísrael?

■ Hvør var orsøkin til, at páskahøgtíðin varð hildin?

■ Hvussu fríaði Jehova ísraelsmenn úr trældómi í Egyptalandi?

STØRSTA BOÐIÐ

Tey Tíggju boðini, sum standa at lesa í Aðru Mósebók 20:1-17, eru helst tey mest kendu av teimum umleið 600 lógunum, ið vórðu givnar við Mósesi. Men tá Jesus Kristus varð spurdur, hvat av Guds boðum er størst av øllum, valdi hann hetta: „Tú skalt elska [Jehova] Gud tín av øllum hjarta tínum, av allari sál tíni, av øllum huga tínum og av allari styrki tíni.“ — Markus 12:28-30; 5 Mósebók 6:5.

8 Ísraelsmenn fara inn í Kána'an

Við Josva á odda hertaka ísraelsmenn Kána'an. Jehova gevur dómarunum heimild at bjarga fólki sínum undan kúgan

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva •
Dómararnir •
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias

FLEIRI hundrað ár, áðrenn Ísrael fór inn í Kána'an, hevði Jehova lovað eftirkomarunum hjá Ábrahami hetta landið. Nú vóru ísraelsmenn, við Josva á odda, til reiðar at taka landið, sum teimum var lovað.

Gud hevði dømt kána'anitar at vera fyribeindar. Teir høvdu fylt landið við ógvisligum og grovum kynsligum gerðum og eirindaleysum blóðbaði. Hetta var orsøkin til, at býirnir í Kána'anslandi, sum ísraelsmenn hertóku, skuldu leggjast fullkomiliga í oyði.

Áðrenn teir hertóku landið, sendi Josva kortini tveir njósnarar hagar. Teir komu til býin Jeriko, har teir fingu innivist hjá eini kvinnu, ið æt Rahab. Hon vardi teir, hóast hon visti, at teir vóru ísraelsmenn. Rahab trúði á Gud Ísraels, tí hon hevði hoyrt, hvussu Jehova hevði bjargað sínum fólki. Hon fekk njósnararnar at gera eið uppá, at hon og húski hennara skuldu verða spard.

Seinni, tá herur ísraelsmanna fór inn í Kána'an og skuldi taka Jeriko, fekk Jehova við einum undri múrarnar í býnum at rapla. Hermenninir hjá Josva lupu á Jeriko og løgdu hann í oyði, men Rahab og húski hennara vórðu bjargað. Í einum munadyggum stríði, sum vardi í seks ár, hertók Josva stórar partar av lovaða landinum. Síðani varð landið býtt ímillum ættir Ísraels.

Móti endanum av drúgvu tænastu síni fyri Gudi, kallaði Josva fólkið saman. Hann minti ísraelsmenn á, hvussu Jehova hevði verið um forfedrar teirra og bað teir inniliga tæna honum. Eftir at Josva og teir elstu, sum høvdu tænt saman við honum, vóru deyðir, vendu ísraelsmenn sær kortini frá Jehova og hildu seg til falskar gudar. Í umleið 300 ár helt tjóðin seg ikki altíð til lógirnar frá Jehova. Í hesum tíðarskeiðinum loyvdi Jehova fíggindum hjá ísraelsmonnum, teirra millum filistarunum, at kúga fólkið. Men tá ísraelsmenn bønaðu Jehova um hjálp, setti hann dómarar — til samans 12 — at bjarga teimum undan fíggindum teirra.

Dómaratíðin, sum er lýst í Dómarabókini, byrjaði við Otniel og endaði við Samsoni, sterkasta manni, sum livað hevur. Grundleggjandi sannleikin, sum ferð eftir ferð verður staðfestur í spennandi frásøguni í Dómarabókini, er hesin: At vera Jehova lýðin ber signing við sær, ólýdni elvir til vanlukku.

— Grundað á Bók Josva; Dómarabókina; Triðju Mósebók 18:24, 25.

■ Hví bjargaði Jehova Rahab og húski hennara?

■ Hvat gjørdu ísraelsmenn, tá Josva var deyður?

■ Hvør grundleggjandi sannleiki er ávístur í Dómarabókini í Bibliuni?



1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
• 1 Sámuelsbók
• 2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
• 1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias

9 Ísraelsmenn vilja hava ein kong

Fyrsti kongurin í Ísrael, Saul, gerst ólýðin. Eftir hann kemur Dávid, sum Jehova ger ein sáttmála við um eitt ævigt ríki

EFTIR tíð Samsons var Sámuel profetur og dómari í Ísrael. Ísraelsmenn søgdu fleiri ferðir, at teir vildu líkjast hinum tjóðunum og hava eitt menniskja til kong. Hóast teir háðaðu Jehova við hesi áheitan, gav Jehova Sámueli boð um at gera, sum fólkið vildi. Gud valdi ein eyðmjúkan mann, ið æt Saul, til kong. Men Saul kongur gjørdist so við og við hástórur og ólýðin. Jehova vrakaði hann sum kong og bað Sámuel velja ein annan — ein ungan mann, ið æt Dávid. Men nógv ár skuldu kortini ganga, áðrenn Dávid bleiv kongur.

„Eg skal í allar ævir grundfesta kongadømi hansara.“
— 2 Sámuel 7:13

Meðan Dávid helst enn var tannáringur, vitjaði hann brøður sínar, sum gjørdu tænastu í herinum hjá Sauli. Allur herurin var ræðslusligin, av tí at ein hermaður hjá fíggindunum, risin Goliat, háðaði ísraelsmenn og Gud teirra. Forharmaður um hetta tók Dávid við avbjóðingini frá risanum og fór í bardaga við hann. Bert útgjørdur við einum sleingibandi og nøkrum fáum steinum fór ungi maðurin ímóti mótstøðumanninum, sum næstan var tríggjar metrar til hæddar. Tá Goliat háðaði Dávid, segði Dávid seg vera best útgjørdan av teimum báðum, tí hann kom ímóti Goliat í navni Guds Jehova! Dávid drap risan við einum steini, tók síðani stóra svørð hansara og høgdi høvdið av honum. Filistaraherurin flýddi í ræðslu.

Í fyrstuni var Saul hugtikin av dirvi Dávids og setti henda unga mannin yvir herfólkið. Men góðu úrslitini hjá Dávidi høvdu við sær, at Saul so við og við gjørdist frá sær sjálvum av øvundsjúku. Dávid mátti flýggja fyri lívinum og livdi sum flóttafólk í nógv ár. Kortini varð hann trúfastur móti konginum, ið vildi drepa hann, tí hann visti, at Jehova Gud hevði sett Saul sum kong. At enda doyði Saul í bardaga. Stutt eftir hetta bleiv Dávid kongur, sum Jehova hevði lovað.

Dávid kongur vildi fegin byggja Jehova eitt tempul. Men Jehova segði við Dávid, at ein av eftirkomarum hansara skuldi gera tað. Hesin vísti seg at vera sonur Dávids, Sálomo. Men Gud lønti Dávidi við at gera ein serligan sáttmála við hann: Í hansara ætt skuldi koma ein kongsætt, ið var øðrvísi enn allar aðrar. Úr hesi ættini skuldi at enda frelsarin ella avkomið, sum lyfti var givið um í Eden, koma. Hesin skuldi vera Messias, ið merkir „hin Salvaði“, sum var útnevndur av Gudi. Jehova lovaði, at Messias skuldi stjórna einum kongaríki, sum skuldi standa í allar ævir.

Sera takksamur savnaði Dávid nógv tilfar og virðismikil metal til tempularbeiðið. Hann gjørdi eisini orð og lag til nógvar innblástar sálmar. Stutt áðrenn Dávid doyði, ásannaði hann: „Andi [Jehova] talar í mær, orð Hansara eru á tungu míni.“ — 2 Sámuel 23:2.

— Grundað á Fyrru og Seinnu Sámuelsbók; Fyrru Krønikubók; Esaias 9:7; Matteus 21:9; Lukas 1:32; Jóhannes 7:42.

■ Hví setti Jehova Dávid til kong í staðin fyri Saul?

■ Hvørjar eginleikar hevði Dávid, longu áðrenn hann bleiv kongur?

■ Hvør er lovaða avkomið, frelsarin, sum skuldi koma í ætt Dávids?

Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin

10 Sálomo stjórnar við vísdómi

Jehova gevur Sálomo eitt víst hjarta. Meðan Sálomo er kongur, gleðast ísraelsmenn um einastandandi frið og ríkidømi

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók •
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók •
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias

HVUSSU hevði lívið verið, um ein heil tjóð við sínum stjórnara gav seg undir Jehova sum fullveldisharra og fylgdi lógum hansara? Svarið varð givið tey 40 árini, Sálomo var kongur.

Áðrenn Dávid doyði, valdi hann sonin hjá sær, Sálomo, til eftirmann. Í einum dreymi bað Gud Sálomo siga, hvat hann ynskti sær. Sálomo bað um vísdóm og kunnskap, so hann kundi døma fólkið rættvíst og skilagott. Henda áheitan gleddi Jehova, og hann gav Sálomo eitt víst og vitugt hjarta. Jehova lovaði honum eisini ríkidømi, æru og eitt langt lív, um hann varð verandi lýðin.

Sálomo gjørdist víðagitin fyri vísu dómar sínar. Í einum føri trættust tvær kvinnur um eitt pinkubarn, sum báðar søgdu seg vera mamma at. Sálomo segði, at drongurin skuldi høggast sundur í tveir partar, so kvinnurnar kundu fáa hvør sína helvt. Fyrstu kvinnuni dámdi væl hugskotið, men rætta mamman bønaði alt fyri eitt Sálomo um at geva hinari kvinnuni barnið. Nú visti Sálomo við vissu, at kvinnan, sum hevði samkenslu, var mamman, og hann gav henni dreingin. Stutt eftir hevði alt Ísrael hoyrt um hesa dómsavgerð, og fólkið skilti, at Sálomo hevði fingið vísdóm sín frá Gudi.

Eitt av størstu avrikunum hjá Sálomo var at byggja tempul Jehova — ein prýðiligan bygning í Jerusalem, sum skuldi vera miðdepil fyri tilbiðjanina í Ísrael. Tá templið varð vígt, bað Sálomo til Gud og segði: „Himlarnir, ja, Himlar Himlanna, taka Teg ikki — hvussu mikið minni tá ikki hetta húsið,ið eg havi bygt!“ — 1 Kongabók 8:27.

Tíðindini um Sálomo frættust til onnur lond, heilt til Saba, sum lá í Arabia. Drotningin í Saba kom ferðandi langar leiðir fyri at síggja dýrd og ríkidømi Sálomos og fyri at vita, hvussu stórur vísdómur hansara var. Drotningin var so bergtikin av vísdómi kongsins og ríkidøminum í Ísrael, at hon lovaði Jehova,ið hevði sett ein so vísan kong í hásætið. Ja, við signingini frá Jehova var tíðin, tá Sálomo var kongur, eyðkend av størsta ríkidøminum og friðinum nakrantíð í fornaldarsøgu Ísraels.

Tíverri gavst Sálomo at fylgja vísdóminum frá Jehova. Hann læt ikki leiðbeining Guds við seg koma og fekk sær fleiri hundrað konur, teirra millum nógvar,ið tilbóðu fremmandar gudar. So líðandi vendu konurnar hjarta hansara burtur frá Jehova, so hann fór at dyrka avgudar. Jehova segði Sálomo frá, at ein partur av ríkinum fór at vera skrætt úr hondum hansara. Men vegna lyftið, Jehova hevði givið faðir Sálomo, Dávidi, skuldi ein lítil partur verða verandi í hansara ætt. Hóast fráfall Sálomos helt Jehova trúfastur sáttmálan um eitt ríki, sum hann hevði gjørt við Dávid.

— Grundað á Fyrru Kongabók, kapittul 1 til 11; Aðru Krønikubók, kapittul 1 til 9; Fimtu Mósebók 17:17.

■ Hvussu svaraði Gud bøn Sálomos?

■ Hvussu kom vísdómur Sálomos til sjóndar?

■ Hví veik Sálomo frá Jehova, og hvat varð úrslitið?



1070 Gud lovar Dávidi eitt ríki | **umleið 1020** Hásongurin liðugur

Sálomo verður kongur **1037** | **1027** Templið í Jerusalem liðugt | **1000 f.o.t.**

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
• Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
• Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin

11 Innblástir sangir, sum ugga og læra

Dávid og aðrir skriva sangir, sum skulu brúkast í tilbiðjanini. Orðini til 150 av teimum eru varðveitt í Sálmunum

TANN størsta bókin í Bíbliuni er eitt savn við andaligum sangum. Teir eru skrivaðir í einum umleið 1000 ára longum tíðarskeiði. Í Sálmunum standa nakrar av teimum djúpastu og mest kensluborinu trúarlýsingunum, sum nakrantíð eru skrivaðar. Ein rød av menniskjansligum kenslum verður lýst í hesum lovsongum, heilt frá gleði og takksemi til sorg, sút og angur. Tað er týðiligt, at sálmaskøldini høvdu eitt álitsfult og inniligt samband við Gud. Latið okkum kanna nøkur evni, sum verða viðgjørd í hesum lýriska savninum.

Jehova hevur rættin til fullveldið, er verdur at verða tilbiðin og lovaður. „Eingin uttan Tú eitur [Jehova], hin hægsti yvir allari jørðini!“ lesa vit í Sálmi 83:19.* Nógvir sálmar hálova Jehova fyri tað, hann hevur skapt, millum annað stjørnuhimmalin, ymisku sløgini av lívi og tað undurfulla mannalikamið. (Sálmur 8, 19, 139, 148) Aðrir dýrmeta Jehova, sum tann Gud, ið bjargar og verjir síni trúføstu. (Sálmur 18, 97, 138) Uppaftur aðrir æra hann sum hin rættvísa Gud, ið tekur sær av teimum kúgaðu og straffar tey óndu. — Sálmur 11, 68, 146.

Jehova hjálpir og uggar tey, ið elska hann. Kendasti sálmurin er kanska Sálmur 23, har Dávid lýsir Jehova sum ein góðan hirða, ið leiðir, verjir og syrgir fyri seyði sínum. Sálmur 65:3 minnir tænarar Guds á, at Jehova er hann, „sum hoyrir bønir“. Nógv, sum hava syndað álvarsliga, hava funnið ugga í at lesa Sálmarnar 39 og 51, har Dávid í inniligum orðingum lýsir, hvussu hann angraði sínar álvarsligu syndir og sigur frá áliti sínum á, at Jehova fyrigevur. Í Sálmi 55:23 er ein eggjan til at hava álit á Jehova og at kasta allar byrðar á hann.

Jehova fer at broyta heimin við Messiasríkinum. Fleiri brot í Sálmunum vísa týðiliga fram til Messias, tann fyriboðaða kongin. Sálmur 2 profeterar, at hesin stjórnarin skal beina fyri teimum óndu tjóðunum, sum veita mótstøðu. Sálmur 72 opinberar, at hann fer at gera enda á hungursneyð, órættvísi og kúgan. Og sambært Sálmi 46:10 skal Gud við Messiasríkinum gera enda á kríggi og eisini forkoma øllum stríðsvápnum. Í Sálmi 37 lesa vit, at tey óndu verða týnd, meðan tey rættvísu harafturímóti skulu búgva á jørðini í allar ævir og gleða seg í fullkomnum friði og samljóði.

— *Grundað á Sálmarnar.*

■ Hvussu staðfesta Sálmarnir, at Jehova hevur rættin at stjórna alheiminum?

■ Hvørjir sálmar vísa, hvussu Gud hjálpir og uggar tey, sum elska hann?

■ Hvussu fer Jehova sambært Sálmunum at broyta heimin?

* Í summum umsetingum er tað ørindi 18.

SANGUR SANGANNA

Í Hásonginum, sum Sálomo kongur skrivaði, avdúkar hann, at sjálvt ómetaliga stórt ríkidømi ikki var nøkur trygd fyri, at hann altíð kundi fáa ta kvinnuna, hann hevði hug á. Hann lýsir, hvussu hann roynir at vinna hjartað hjá eini ungari vakrari moyggj, men hon var longu góð við ein ungan hirða. Hesin innblásti sangurin vísir, at tvey, sum eru sterkt drigin hvørt at øðrum, ikki nýtast at bera seg ósømiliga at. Unga parið, sum verður lýst í Hásonginum, vísir undranarvert tamarhald, sóma og trúfesti.

12 Lívsvísdómur frá Gudi

Orðtøkini eru eitt savn av innblástum ráðum, sum kunnu gagna okkum í dagligdegnum. Tey flestu av teimum hevur Sálomo skrivað

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini •
Prædikarin •
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus

ER JEHOVA ein vísur stjórnari? Hyggja vit nærri at leiðbeiningini, hann gevur, kunnu vit svara spurninginum við fullari vissu. Riggar hon? Fáa vit eitt betri og meiri sigandi lív, um vit fylgja henni? Hin vísi Sálomo kongur skrivaði fleiri hundrað orðtøk, sum nema nærum øll viðurskifti í lívinum. Latið okkum taka nøkur dømi.

At hava álit á Gud. Álit er lykilin til eitt gott samband við Jehova. Sálomo skrivaði: „Lít á [Jehova] av øllum hjarta tínum, men lít ikki á vit títt! Kenn Hann á øllum leiðum tínum! So skal Hann gera gøtur tínar rættar.“ (Orðtøkini 3:5, 6) At líta á Gud við at søkja hansara leiðbeining og vera honum lýðin gevur lívinum djúpa meining. Eitt menniskja, sum heldur hesa kós, kann gleða Jehova og geva honum eitt svar til ákærurnar, sum mótstøðumaður hansara, Satan, hevur borið fram. — Orðtøkini 27:11.

At umgangast onnur við vísdómi. Ráðini, Gud gevur monnum, konum og børnum, eru meiri tíðarhóskandi nú enn nakrantíð. Við gifta mannin sigur Gud: „Gleð teg í konu ungdóms tíns!“ Tað merkir, at hann má verða henni trúgvur. (Orðtøkini 5:18-20) Giftar kvinnur finna í Orðtøkunum eina vakra lýsing av eini dugnaligari konu, sum hevur mann og børn, ið meta hana høgt. (Orðtøkini, kapittul 31) Og børn fáa leiðbeining um at akta foreldur síni. (Orðtøkini 6:20) Orðtøkini vísa eisini, at vinaløg hava alt at siga fyri eitt menniskja, tí at halda seg fyri seg sjálvan fremur sjálvsøkni. (Orðtøkini 18:1) Av tí at vinir kunnu ávirka okkum antin við góðum ella ringum, noyðast vit at velja teir við vísdómi. — Orðtøkini 13:20; 17:17.

At fara væl við sær sjálvum. Orðtøkini geva ómetaliga góð ráð um ikki at misnýta rúsdrekka, um at ala fram sunnar kenslur og standa ímóti niðurbrótandi kenslum og um at vera raskur til arbeiðis. (Orðtøkini 6:6; 14:30; 20:1) Tey ávara um, at tað leiðir í vanlukku at líta á menniskjaligar metingar heldur enn leiðbeiningina frá Gudi. (Orðtøkini 14:12) Tey eggja okkum til at verja innara menniskjað, hjartað, fyri spillandi ávirkan og minna okkum á, at 'úr hjartanum gongur lívið út'. — Orðtøkini 4:23.

Milliónatals menniskju í øllum heiminum hava sannroynt, at lívið verður betri við at fylgja slíkum ráðum. Tey kunnu tí av góðari grund viðurkenna Jehova sum sín stjórnara.

— *Grundað á Orðtøkini.*

■ Hvat lærir tað okkum at kanna Orðtøkini?

■ Hvør leiðbeining er í Orðtøkunum um at líta á Gud og at brúka vísdóm í viðferðini av øðrum og okkum sjálvum?

PRÆDIKARIN

Hvar kunnu vit finna nøgdsemi og meining við lívinum? Sálomo hevði ein einastandandi møguleika at leita eftir svarinum. Óvanliga stóra ríkidømi hansara, vísdómurin og maktin, hann hevði, gjørdi tað møguligt hjá honum at vita, um okkurt av hesum kundi gera hann veruliga nøgdan. Hann tráaði eftir gleðini um tað materiella, gifti seg við nógvum vøkrum kvinnum og hevði spennandi áhugamál. Hann framdi stórar byggiætlanir. Og hann granskaði vísdómin, sum var at finna í tí, sum skrivað var. Hvørja niðurstøðu kom hann til? At „alt er fáfongd!“ Men hann kom eisini fram til hesa djúpu viðurkenning: „Endin á øllum, nú ið alt er hoyrt, er hetta: Óttast Gud og halt boð Hansara! Tað er tað, ið hvørt menniskja eigur at gera.“ — Prædikarin 12:8, 13.

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
• 1 Kongabók
• 2 Kongabók
1 Krønikubók
• 2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
• Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias

13 Góðir kongar og óndir kongar

Ísrael verður býtt sundur. Við tíðini ráða nógvir kongar yvir ísraelsmonnum, og teir flestu av teimum eru trúleysir. Bábelsmenn leggja Jerusalem í oyði

JÚST sum Jehova hevði fyriboðað, bleiv Ísraels ríki býtt sundur, eftir at Sálomo var fallin frá sonnu tilbiðjanini. Sonur og eftirmaður hansara, Rehabeam, var strangur, og tí gjørdu tíggju av ættum Ísraels uppreistur og stovnaðu norðurríkið Ísrael. Tvær ættir vórðu verandi trúfastar móti konginum á Dávids trúnu í Jerusalem, tá tær stovnaðu suðurríkið Juda.

Bæði ríkini høvdu eina ófriðarliga søgu í stóran mun orsakað av trúleysum og ólýdnum kongum. Tað gekk verri hjá Ísrael enn hjá Juda, tí har framdu kongarnir heilt úr byrjanini falska tilbiðjan. Hóast tær veldigu gerðirnar hjá profetunum Eliasi og Elisa — báðir reistu enntá upp deyð — fullu ísraelsmenn ferð eftir ferð aftur til óndu gerðir sínar. At enda læt Gud Assýria leggja norðurríkið í oyði.

Juda var til í meira enn hundrað ár longur enn Ísrael, men bleiv eisini straffað av Gudi. Bert fáir kongar í Juda lurtaðu eftir ávaringunum frá Guds profetum og royndu at leiða tjóðina aftur til Jehova. Til dømis fór Josias kongur í holt við at reinsa Juda fyri falska tilbiðjan og umvæla Jehova tempul. Tá eitt upprunaeintak av lógini, sum Gud hevði givið við Mósesi, varð funnið, ávirkaði tað Josias nógv, og hann styrkti átakið við at fáa alt aftur á beint.

Tíverri fylgdu eftirmenn Josiasar ikki hansara góða fyridømi. Tí loyvdi Jehova tjóðini Bábel at hertaka Juda og oyðileggja Jerusalem og templið. Tey, sum yvirlivdu vórðu leidd til Bábel í útlegd. Gud boðaði frá, at útlegdin skuldi vara í 70 ár. Juda lá oyðið alla hesa tíðina — inntil fólkið, sum lovað, kundi fara heim aftur til land sítt.

Men eingir kongar í Dávids ætt skuldu ráða, fyrr enn tann lovaði frelsarin, tann fyriboðaði Messias, setti seg á trúnuna. Teir flestu av kongunum, sum høvdu sitið á Dávids trúnu í Jerusalem, prógvaðu, at ófullkomin menniskju ikki eru egnað at ráða yvir øðrum. Bara Messias er veruliga egnaður til tað. Soleiðis segði Jehova við tann síðsta kongin í Dávids ætt: „Niður við krúnuni . . . Tað [kongadømið] skal ikki meira vera til, til hann kemur, sum hevur rættin til tess, og sum eg gevi tað.“ — Ezekiel 21:26, 27, *Løggilda føroyska umsetingin*.

— Grundað á Fyrru og Seinnu Kongabók; Seinnu Krønikubók, kapittul 10 til 36; Jeremias 25:8-11.

■ Hví bleiv Ísrael býtt sundur, og hvussu gekst teimum báðum ríkjunum?

■ Hvat hendi kongarøðini í ætt Dávids, og hví?

■ Hvat vísir frásøgan um Jónas okkum um Jehova? (Sí rammuna).

JÓNAS

Eftir at ríkið var býtt sundur, gav Gud Jónasi uppgávuna at ávara fólkini í tí fjarskotna býnum Nineve, sum var fullur av harðskapi. Men Jónas fór heldur umborð á eitt skip, sum fór beint øvuta vegin. Tað hevði eitt undur við sær — Gud læt ein ógvuliga stóran fisk svølgja Jónas. Meðan Jónas var í fiskinum, bað hann til Jehova, sum syrgdi fyri, at fiskurin spýði hann upp á turt land. Síðani fór Jónas at røkja uppgávu sína.

Eftir at Gud soleiðis hevði lært Jónas lýdni, stakk ein nýggjur trupulleiki seg upp: Jónas bar ninevemonnum tíðindini, men bleiv sera misnøgdur, tá Gud vísti teimum miskunn og samkenslu og ikki straffaði tey, tí tey angraðu. Les áhugaverdu frásøguna í bók Jónasar og legg til merkis, hvussu Gud við einum undri aftrat lærdi Jónas at hava samkenslu.

14 Gud talar til fólkið við profetum sínum

Jehova útnevnir profetar at bera boðskapir um dóm, reina tilbiðjan og vónina um Messias

Í TÍ tíðarskeiðinum, tá kongar vóru í Ísrael og Juda, gjørdi ein serligur bólkur av monnum vart við seg — profetarnir. Hesir menn, sum vóru sera djarvir og høvdu eina sterka trúgv, bóru fólki boðskapir frá Gudi. Latið okkum kanna fýra umráðandi evni, sum profetarnir løgdu fram.

1. Oyðing Jerusalems. Langt frammanundan fóru Guds profetar — serliga Esaias og Jeremias — at ávara um, at Jerusalem skuldi leggjast í oyði og blíva manntómt. Við livandi orðingum lýstu teir, hví býurin hevði vreiði Guds uppiborna. Íbúgvar Jerusalems søgdu seg umboða Jehova, men hetta uppáhaldið varð gjørt til skammar av teimum følsku halgisiðunum, mutrinum og harðskapinum. — 2 Kongabók 21:10-15; Esaias 3:1-8, 16-26; Jeremias 2:1–3:13.

2. Sanna tilbiðjanin verður endurreist. Eftir 70 ár í útlegd skuldi Guds fólk verða fríað úr Bábel. Ísraelsmenn skuldu fara heim aftur til land sítt, sum lá oyði, og endurbyggja tempul Jehova í Jerusalem. (Jeremias 46:27; Amos 9:13-15) Umleið 200 ár frammanundan boðaði Esaias frá, hvør ið skuldi vinna á Bábel og lata Guds fólk endurreisa sonnu tilbiðjanina. Navnið á sigurvinnaranum var Kýrus. Esaias lýsti enntá í smálutum hernaðarlist Kýrusar. — Esaias 44:24–45:3.

3. Koma Messiasar og smálutir um, hvussu honum skuldi gangast. Messias skuldi verða føddur í býnum Betlehem. (Mika 5:2) Hann skuldi vera eyðmjúkur og ríða inn í Jerusalem á einum esli. (Zakarias 9:9) Hóast hann skuldi vera mildur og vinarligur, fór hann at verða illa umtóktur, og nógv fóru at vísa hann frá sær. (Esaias 42:1-3; 53:1, 3) Hann skuldi fáa ein ræðuligan deyða. Fór hann so altíð at vera deyður? Nei, tí hansara offur skuldi gera tað møguligt hjá nógvum at fáa syndir sínar fyrigivnar. (Esaias 53:4, 5, 9-12) Og tað kundi bara henda, um hann fekk eina uppreisn.

4. Stjórn Messiasar yvir jørðini. Tá ófullkomin menniskju stjórna hvør øðrum, hevur tað ikki frið við sær, men kongurin, Messias, skuldi kallast Friðarhøvdingi. (Esaias 9:6, 7; Jeremias 10:23) Meðan hann er kongur, fara øll menniskju at hava frið sínámillum, og eisini við øll dýrini. (Esaias 11:3-7) Sjúka hvørvur. (Esaias 33:24) Sjálvt deyðin verður við alla gjørdur til einkis. (Esaias 25:8) Tá Messias er kongur, fáa menniskju, sum eru deyð, uppreisn til lív á jørðini. — Daniel 12:13.

— Grundað á bøkurnar Esaias, Jeremias, Dániel, Amos, Mika og Zakarias.

- Hvørji sløg av boðskapum bóru Guds profetar?
- Hvussu fyriboðaðu profetarnir oyðing Jerusalems og endurreisnina av sonnu tilbiðjanini?
- Hvat søgdu profetar Jehova um Messias og tað, sum skuldi henda honum?
- Hvussu lýstu profetarnir stjórn Messiasar yvir jørðini?

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias •
Jeremias •
Sorgarsongirnir •
Ezekiel •
Dániel •
Hoseas •
Jóel •
Amos •
Obadias •
Jónas •
Mika •
Nahum •
Habakkuk •
Zefanias •
Haggai •
Zakarias •
Malakias •
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
• Ezra
• Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
• Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin

15 Ein profetur í útlegd sær inn í framtíðina

Dániel profeterar um Guds ríki og komu Messiasar.
Bábel fellur

DÁNIEL, ein ungur maður, ið vísti undranarvert sakloysi, varð førdur í útlegd í Bábel, áðrenn Jerusalem varð lagt í oyði. Hann og nakrir aðrir jødar — útlagnir úr hertikna ríkinum, Juda — fingu eitt ávíst frælsi frá teimum, sum høvdu tikið teir til fanga. Gud signaði Dániel ríkliga í hansara langa lívi í Bábel; hann kom livandi úr einum leyvubøli og fekk sjónir, sum lótu hann skoða langt inn í framtíðina. Týdningarmestu profetiirnar hjá Dánieli snúðu seg um Messias og stjórn hansara.

Dániel fær at vita, nær Messias skuldi koma. Dániel fekk at vita, nær Guds fólk kundi vænta, at Messias ella „ein Salvaður, ein Høvdingi“ kom — 69 árvikur eftir, at boð vórðu givin um at endurreisa og endurbyggja múrar Jerusalems. Ein vanlig vika varir sjey dagar; ein árvika varir sjey ár. Hesi boð vórðu givin í 455 f.o.t., langa tíð eftir at Dániel var deyður. Tá byrjaðu tær 69 'vikurnar', sum vardu í 483 ár og endaðu í ár 29 e.o.t. Næsti parturin í hesum heftinum sigur okkum, hvat hendi tað árið. Dániel sá eisini frammanundan, at Messias skuldi verða „fyribeindur“ ella dripin, so hann kundi bøta fyri synd. — Dániel 9:24-26.

Messias skuldi blíva kongur í himli. Í eini óvanligari sjón av sjálvum himlinum sá Dániel, at Messias, ið nevnist „ein, sum líktist menniskjasyni“, kom fram fyri trúnuna hjá Jehova sjálvum. Jehova gav honum „vald, heiður og ríki“. Hetta ríkið skuldi standa um ævir. Dániel fekk eisini eina aðra spennandi og nágreiniliga frágreiðing um Messiasríkið — kongurin skuldi hava onnur at ráða saman við sær, ein bólk, ið nevnist „hini heiløgu hins Hægsta“. — Dániel 7:13, 14, 27.

Ríkið sorar stjórnirnar í hesum heimi. Gud gjørdi Dániel føran fyri at týða ein dreym, sum hevði ørkymlað Nebukadnezar, kongin í Bábel. Kongurin hevði sæð eina risastóra standmynd við einum høvdi av gulli, bróst og armar vóru av silvuri, búkur og lendar av kopari, bein av jarni og føtur av jarni blandað upp í leir. Ein steinur varð rivin leysur úr einum fjalli, rakti teir veiku føturnar og soraði standmyndina sundur til dust. Dániel greiddi frá, at ymisku partarnir av standmyndini umboðaðu eina langa rød av heimsríkjum, tað fyrsta var Bábel, høvdið av gulli. Hann sá frammanundan, at tá ið tað síðsta ríkið í hesum ónda heiminum ráddi, skuldi Guds ríki fara til verka. Tað skuldi sora allar stjórnirnar í hesum heimi. Og síðani skuldi hetta ríkið ráða um ævir. — Dániel, kapittul 2.

Sum ein sera gamal maður sá Dániel fall Bábels. Kýrus kongur hertók býin, júst sum profetarnir høvdu boðað frá. Stutt eftir vórðu jødarnir umsíðir fríaðir úr útlegd síni — og tað rættstundis, eftir at heimland teirra, sum fráboðað, hevði ligið oyðið í 70 ár. Við trúføstum landshøvdingum, prestum og profetum á odda endurbygdu jødarnir at enda Jerusalem og tempul Jehova. Men hvat skuldi henda, tá ið tey 483 árini vóru liðin?

— *Grundað Dániels Bók.*

■ Hvat fekk Dániel at vita um Messias og Guds ríki?
■ Hvat skuldi Guds ríki gera við stjórnirnar í hesum heimi?

Eftir 443 f.o.t. Malakias ger sína profetisku bók lidna

455 f.o.t. 69 árvikur byrja

16 Messias kemur

Jehova sigur fólki frá, at Jesus úr Nazaret er tann Messias, sum tey langt síðan høvdu fingið lyfti um

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus •
Markus •
Lukas •
Jóhannes •
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv

FÓR Jehova at hjálpa fólki at gera av, hvør ið var tann lovaði Messias? Ja. Latið okkum kanna hvussu. Umleið 400 ár vóru farin, síðani Hebraisku skriftirnar vóru lidnar. Í einum býi, sum nevndist Nazaret, í Galilea, fekk ein ung kvinna, sum æt Maria, eina rættiliga óvæntaða vitjan. Ein eingil, Gabriel at navni, vísti seg fyri henni og greiddi henni frá, at Gud við síni virksomu kraft skuldi gera hana við barn, so hon føddi ein son, hóast hon var moyggj. Hesin sonurin skuldi verða tann lovaði kongurin, ið sum fyriboðað skuldi ráða í allar ævir! Barnið skuldi vera Guds egni sonur. Gud fór at flyta lívið hjá honum úr himli til lívmóðurina hjá Mariu.

Maria tók lítillátað við hesi heiðurligu uppgávu. Trúlovaði hennara, ein timburmaður sum æt Jósef, gifti seg við henni, eftir at Gud við einum eingli hevði greitt honum frá, hvussu Maria var vorðin við barn. Hvussu so við profetiini um, at Messias skuldi føðast í Betlehem, tí lítla býnum, sum lá umleið 140 kilometrar burtur? — Mika 5:1.

Ein rómverskur stjórnari sendi skriv út um, at manntal skuldi vera. Fólk fingu boð um at skráseta seg í býnum, sum tey upprunaliga komu úr. Tað sær út til, at bæði Jósef og Maria vóru ættað úr Betlehem, og tí fór Jósef hagar saman við konu síni, ið var við barn. (Lukas 2:3) Maria átti undir fátæksligum viðurskiftum í einum fjósi og legði barnið í eina krubbu. So sendi Gud ein eingil, sum fortaldi einum bólki av hirðum á markini, at nýfødda barnið var hin lovaði Messias, ella Kristus.

Seinni skuldu eisini onnur vátta, at Jesus var hin lovaði Messias. Esaias profetur hevði boðað frá, at ein maður skuldi koma og gera vegin til reiðar fyri tí týdningarmikla arbeiðinum hjá Messiasi. (Esaias 40:3) Undanmaðurin var Jóhannes Doypari. Tá hann sá mannin Jesus, brast úr honum: „Hygg lamb Guds, sum tekur burt synd heimsins!“ Nakrir lærisveinar hjá Jóhannesi fóru alt fyri eitt at fylgja Jesusi. Ein teirra segði: „Vit hava funnið Messias.“ — Jóhannes 1:29, 36, 42.

Aðrir vitnisburðir vóru eisini. Tá Jóhannes doypti Jesus, talaði Jehova sjálvur av himli. Við heilaga anda sínum vísti hann, at Jesus var Messias og segði: „Hesin er Sonur Mín, hin elskaði, sum Eg havi tokka til.“ (Matteus 3:16, 17) Hin lovaði Messias var komin!

Nær hendi hetta? Í ár 29 e.o.t., júst tá tey 483 árini, sum Dániel hevði boðað frá, vóru liðin. Ja, hetta er ein partur av teimum mongu vitnisburðunum um, at Jesus er Messias ella Kristus. Men hvønn boðskap fór hann so at boða, meðan hann var á jørðini?

— Grundað á Matteus, kapittul 1 til 3; Markus, kapittul 1; Lukas, kapittul 2; Jóhannes, kapittul 1.

■ Hvussu nýtti Jehova einglar til at vísa, at Jesus var Messias?

■ Hvussu nýtti Gud Jóhannes Doypara til at vísa, at Jesus var Messias?

■ Hvussu vísti Jehova sjálvur, at sonur hansara var Messias?

GUDS SONUR — Í HVØRJARI MERKING?

Jehova er Faðir at Jesusi — men ikki í somu merking sum menn eru fedrar. Jesus var ikki gitin á vanligan hátt, tí Gud skapti hann. Ja, hann var tann allarfyrsti, Jehova skapti. (Kolossebrævið 1:15-17) Av tí at Jehova við at skapa Jesus gav honum lívið, kann hann kallast Faðir at Jesusi. Eftir at hava skapt henda andasonin brúkti Jehova hann sum sín ’verkstjóra’ til at skapa alt annað, eisini fysiska alheimin. — Orðtøkini 8:30.

Jesus verður føddur **umleið 2 f.o.t.**

1 f.o.t. **1 e.o.t.** **gev gætur:** Einki ár null

29 e.o.t. Jesus verður doyptur

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir

17 Jesus lærir onnur um Guds ríki

Jesus lærir lærisveinar sínar mangt, men leggur serligan dent á eitt ávíst evni — Guds ríki

HVØRJA uppgávu hevði Jesus á jørðini? Sjálvur segði hann: 'Eg má kunngera evangeliið um ríki Guds; tí tað eri Eg sendur til.' (Lukas 4:43) Latið okkum kanna fýra ting, sum Jesus lærdi onnur um hetta ríkið, sum var høvuðsevnið í hansara boðan.

'Hann ferðaðist um gjøgnum býir og bygdir og prædikaði og kunngjørdi evangeliið um ríki Guds.' — *Lukas 8:1*

1. Jesus skuldi vera kongur. Jesus segði beinleiðis, at hann var hin fyriboðaði Messias. (Jóhannes 4:25, 26) Hann vísti eisini, at hann var kongurin, sum profeturin Dániel hevði sæð í eini sjón. Jesus fortaldi ápostlunum, at hann einaferð skuldi sita í „hásæti dýrdar Sínar", og at teir eisini skuldu sita í hásætum. (Matteus 19:28) Hann nevndi tey,ið hoyra til bólkin av samstjórnarum, sítt „lítla fylgi", og hann fortaldi eisini, at hann hevði „annan seyð", sum ikki var ein partur av hesum bólkinum. — Lukas 12:32; Jóhannes 10:16.

2. Guds ríki skuldi fremja satt rættvísi. Jesus vísti á, at Ríkið skuldi beina fyri størstu órættvísini av øllum við at halga Guds navn, Jehova, og reinsa alla vanæru burtur, sum Satan hevur dálkað tað við síðan uppreisturin í Eden. (Matteus 6:9, 10) Jesus var eisini ópartískur í gerandisdegnum, hann undirvísti øllum, uttan mun til um tað vóru menn, kvinnur, rík ella fátøk. Og hóast uppgáva hansara í fyrstu atløgu var at undirvísa jødunum, royndi hann eisini at hjálpa samverjum og ikkijødum. Mótsett trúarleiðarunum tá í tíðini, hevði hann als ongar fordómar.

3. Guds ríki skuldi ikki vera ein partur av hesum heimi. Jesus livdi í eini tíð við stórum broytingum. Fremmand høvdu valdið í heimlandi hansara. Men tá fólk royndu at fáa hann til at taka lut í tátíðar politikki, rýmdi hann. (Jóhannes 6:14, 15) Hann segði við ein politikara: „Ríki Mítt er ikki av hesum heimi." (Jóhannes 18:36) Og við lærisveinarnar segði hann: „Tit eru ikki av heiminum." (Jóhannes 15:19) Hann vildi ikki, at teir skuldu taka til vápn, heldur ikki fyri at verja hann. — Matteus 26:51, 52.

4. Stjórn Kristusar skuldi vera grundað á kærleika. Jesus lovaði at geva fólki nýggja styrki, at lætta um byrðar teirra. (Matteus 11:28-30) Og hann helt tað, hann lovaði. Hann gav innilig og hent ráð um, hvussu mann klárar stúranir, fær betri viðurskifti við onnur, kann standa ímóti materialismu og verða eydnusamur. (Matteus, kapittul 5-7) Kærleikin, hann vísti, gjørdi hann fyrikomandi. Tað hevði við sær, at fólk úr øllum samfelagsstættum — eisini tey mest kúgaðu — fylktust um hann í áliti á, at hann fór væl við teimum og hugsaði um virðileika teirra. Tað er einki at ivast í, at Jesus verður ein einastandandi stjórnari!

Jesus lærdi eisini onnur um Guds ríki á ein annan, ógvuliga máttmiklan hátt. Hann gjørdi nógv undur. Hví gjørdi hann tað? Latið okkum kanna tað.

— *Grundað á Matteus, Markus, Lukas og Jóhannes.*

■ Hvussu lærdi Jesus onnur, at hann var Messias, kongurin?

■ Hvussu vísti Jesus, at hann fór at stjórna við rættvísi?

■ Hvussu gjørdi Jesus tað greitt, at ríki hansara ikki skuldi vera ein partur av heiminum?

■ Hvussu vísti Jesus, at stjórn hansara skuldi vera grundað á kærleika?

Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
• Matteus
• Markus
• Lukas
• Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrerabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin

18 Jesus ger undur

Jesus vísir við undrum sínum, hvussu hann fer at útinna sítt kongsvald

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt

GUD gjørdi Jesus føran fyri at gera nakað, sum onnur menniskju ikki kundu. Jesus gjørdi nógv undur — ofta meðan heilir skarar hugdu at. Hesi undrini vístu, at Jesus hevur vald á fíggindum og trupulleikum, sum ófullkomin menniskju ongantíð hava verið før fyri at fáa bilbugt við. Latið okkum taka nøkur dømi.

Hungur. Fyrsta undrið, Jesus framdi, var at gera vatn til vín. Tvær ferðir mettaði hann svangar mannamúgvur, ið taldu fleiri túsund, við bert nøkrum fáum breyðum og fiskum. Í báðum førum var ov mikið av mati til øll.

Sjúka. Jesus grøddi „hvørja sjúku og alskyns veikleika hjá fólkinum“. (Matteus 4:23) Hann grøddi blind, deyv, spitølsk, epileptikarar, lamin, krypil og løstað. Eingin sjúka var, sum hann ikki var førur fyri at grøða.

Vandamikið veður. Tá ið Jesus og lærisveinar hansara sigldu yvir um Galileavatnið, kom harður stormur. Lærisveinarnir vóru ræðsluslignir. Men Jesus hugdi bert eftir óveðrinum og segði: „Tig, ver stilt!“ Og hann makaði vindin, tað varð blikalogn. (Markus 4:37-39) Eina aðra ferð kom hann í ræðuligum illveðri gangandi eftir vatninum. — Matteus 14:24-33.

Illir andar. Illir andar eru nógv sterkari enn menniskju. Nógv menniskju hava einki megnað ímóti hesum óndu fíggindum Guds og hava ikki kunnað sloppið sær undan valdi teirra. Men tá Jesus ferð eftir ferð rak slíkar andar út úr fólki, tók hann teir av ræði. Hann ræddist ikki illu andarnar. Teir ræddist hinvegin hann, tí teir vistu, hvønn myndugleika hann hevði.

Deyði. „Síðsti fíggindin“, sum deyðin av røttum verður nevndur, er ein fíggindi, sum einki menniskja kann vinna á. (1 Korintbræv 15:26) Og kortini reisti Jesus nøkur upp frá deyðum, millum annað gav hann einari mammu, sum var einkja, sonin aftur, og tvey syrgjandi foreldur fingu ungu dóttur sína aftur. Ein annar undranarverður tilburður var, tá Jesus, meðan ein skari av syrgjandi fólki hugdi at, reisti kæra vin sín Lazarus upp frá deyðum, hóast hann hevði verið deyður í næstan fýra dagar! Sjálvt ringastu fíggindar Jesusar viðgingu, at hann hevði framt hetta undrið. — Jóhannes 11:38-48; 12:9-11.

Hví gjørdi Jesus øll hesi undrini? Doyðu tey, sum hann hjálpti, ikki aftur? Jú, men undrini hjá Jesusi høvdu kortini varandi virði, tí tey vóru prógv um, at allar tær spennandi profetiirnar um Messiasríkið bygdu á veruleikan. Vit skulu ikki ivast í, at útnevndi kongur Guds kann gera hungur, sjúku, vandamikið veður, illar andar og enntá deyðan til einkis. Hann hevur longu prógvað, at Gud hevur givið honum vald á øllum hesum.

— Grundað á bøkurnar Matteus, Markus, Lukas og Jóhannes.

■ Hvussu vísti Jesus, at hann hevði vald á hungri? sjúku? vandamiklum veðri? illum andum? deyðanum?

■ Hvat vísa undrini hjá Jesusi um hansara framtíðar stjórn á jørðini?

Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus •
Markus •
Lukas •
Jóhannes •
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
• Matteus
• Markus
• Lukas
Jóhannes

19 Jesus kemur við eini víðfevndari profeti

Jesus sigur, hvat fer at eyðkenna hansara hjáveru í kongsveldi og endan á hesi heimsins skipan

MEÐAN fýra av ápostlunum sótu einsamallir saman við Jesusi á Oljufjallinum við frálíkum útsýni yvir Jerusalem og templið, bóðu teir hann greiða sær frá nøkrum av hansara viðmerkingum. Jesus hevði júst sagt, at templið í Jerusalem skuldi leggjast í oyði. Og eina aðra ferð hevði hann tosað um enda tíðarinnar. (Matteus 13:40, 49) Nú spurdu ápostlarnir: „Hvat verður teknið fyri hjáveru tíni og endanum á heimsskipanini?“ — Matteus 24:3, *Ny Verden-Oversættelsen.*

Í svari sínum segði Jesus frá tí, sum skuldi henda, áðrenn Jerusalem varð oyðilagt. Men hansara orð høvdu víðari merking. Profetiin skuldi fáa eina uppaftur størri heimsumfatandi uppfylling seinni. Jesus profeteraði, at fleiri samanfallandi hendingar og heimsviðurskifti skuldu vera eitt tekin. Hetta teknið skuldi vísa íbúgvunum á jørðini, at Jesus nú var hjástaddur sum kongur í himli. Við øðrum orðum skuldi teknið vera ein ábending um, at Jehova Gud hevði sett Jesus sum kong í Messiasríkinum, sum hann langt síðani hevði givið lyfti um. Teknið skuldi merkja, at Ríkið skjótt fór at beina fyri óndskapi og geva mannaættini sannan frið. Tað, Jesus boðaði frá, skuldi soleiðis bera boð um síðstu dagarnar hjá hesi gomlu heimsins skipan — tær átrúnaðarligu, politisku og sosialu skipanirnar, sum eru í dag — og byrjanina av eini nýggjari skipan.

Jesus segði, hvat ið skuldi henda á jørðini, meðan hann var hjástaddur sum kongur í himli. Hann segði, at tá skuldu vera altjóða kríggj, matvørutrot, stórir jarðskjálvtar og nógvar sjúkur. Lógloysið skuldi versna. Sonnu lærisveinar Jesusar skuldu bera gleðiboðskapin um Guds ríki út um alla jørðina. Alt hetta skuldi koma í hæddina í eini „trongd“ so stórari sum ongantíð áður. — Matteus 24:21.

Hvussu skuldu Jesu lærisveinar kunna vita, nær henda trongdin nærkaðist? ’Lærið av fikutrænum,’ segði Jesus. (Matteus 24:32) Tá ið bløðini á fikutrænum spretta, sæst týðiliga, at summarið er nær. Og tá alt tað, Jesus hevði sagt frá, hendi í einum ávísum tíðarskeiði, skuldi tað vera týðiligt tekin um, at endin var nær. Sum Jesus segði, visti eingin uttan Faðirin nágreiniliga, hvønn dag og tíma stóra trongdin skuldi byrja. Hann eggjaði tí lærisveinum sínum: „Síggið til, vakið og biðið! Tí tit vita ikki, nær tíðin er.“ — Markus 13:33.

— Grundað á Matteus, kapittul 24 og 25; Markus, kapittul 13; Lukas, kapittul 21.

■ Hvørjum vildu ápostlarnir hjá Jesusi gjarna hava greiðu á?

■ Hvat merkir teknið, Jesus gav, og hvat skuldi eyðkenna teknið?

■ Hvat ráð gav Jesus lærisveinunum?

TEKNIÐ FYRI HJÁVERU KRISTUSAR

Jesus segði frá einum tekni, sum skuldi vísa, at Gud skjótt fór at oyðileggja hesa óndu heimsskipanina. Síðani fyrra veraldarbardaga hevur mannaættin sæð tað, sum Jesus profeteraði um. Gongdin í øllum heiminum innan átrúnað, politikk og samfelagslív vísir, at henda heimsins skipan skjótt nærkast endanum. Jesus lærdi lærisveinar sínar, at skuldu teir yvirliva, máttu teir vakja og avgjørdir velja Guds síðu í stríðsspurninginum um alheims fullveldið.* — Lukas 21:36; Matteus 24:3-14.

* Fleiri upplýsingar um profetiina hjá Jesusi eru at finna á síðu 86-95 í bókini *Hvat lærir Biblian veruliga?,* sum Jehova Vitni hava givið út.



20 Jesus Kristus verður dripin

Jesus stovnar eina nýggja høgtíð; hann verður svikin og negldur á ein steyra

EFTIR at hava boðað og undirvíst í trý og eitt hálvt ár, visti Jesus, at tíðin, hann hevði á jørðini, var um at vera úti. Jødisku trúarleiðararnir løgdu ráð um at drepa hann, men teir stúrdu fyri, at tað skuldi órógva fólkið, sum metti hann at vera ein profet. Kortini ávirkaði Satan ein av teimum 12 ápostlunum hjá Jesusi — Judas Iskariot — so hann bleiv ein svíkjari. Trúarleiðararnir bjóðaðu Judasi 30 silvurpengar fyri at svíkja Jesus.

Tað síðsta kvøldið var Jesus saman við ápostlum sínum fyri at halda páskir. Eftir at hava sent Judas avstað, stovnaði hann eina nýggja høgtíð, Kvøldmáltíð Harrans. Hann tók eitt breyð, bað eina bøn og gav teimum 11 ápostlunum, sum eftir vóru, breyðið. „Hetta er likam Mítt, sum verður givið fyri tykkum," segði hann. „Gerið hetta til minni um Meg!" Hann gjørdi tað sama við ein kalik við víni í og segði: „Hesin kalikur er hin nýggi sáttmálin í blóði Mínum." — Lukas 22:19, 20.

Jesus hevði nógv at siga ápostlunum hetta kvøldið. Hann gav teimum eitt nýtt boð — at teir skuldu vísa hvør øðrum ósjálvsøknan kærleika. Hann segði: „Av tí skulu øll sanna, at tit eru lærisveinar Mínir — at tit hava kærleika hvør til annan." (Jóhannes 13:34, 35) Hann bað teir endiliga ikki missa mótið av teimum syndarligu hendingunum, sum skjótt skuldu fara fram. Jesus bað inniliga fyri teimum. Saman sungu teir lovsangir, og so fóru teir út í náttina.

Í urtagarðinum Getsemane fall Jesus á knæ og bað eina inniliga bøn. Skjótt eftir komu vápnaðir hermenn, prestar og onnur at handtaka hann. Judas fór yvir til Jesus og vísti á hann við einum kossi. Meðan hermenninir bundu Jesus, flýddu ápostlarnir.

Fyri jødiska hægstarættinum gjørdi Jesus greitt, at hann var sonur Guds. Rætturin ákærdi hann fyri gudsspottan og dømdi hann sekan til deyða. Síðani varð hann førdur til rómverska landshøvdingin Pontius Pilatus. Hóast Pilatus ikki kendi Jesus sekan í nakrari brotsgerð, gav hann mannamúgvuni hann, og hon kravdi, at hann skuldi doyggja.

Jesus varð førdur til Golgata, har rómverskir hermenn negldu hann á ein steyra. Klára dagsljósið broyttist við einum undri til myrkur. Út á seinnapartin doyði Jesus, og ein stórur jarðskjálvti varð. Likam hansara varð lagt í eina grøv, sum var høgd inn í klettin. Dagin eftir innsiglaðu prestarnir grøvina og settu vaktarmenn við inngongdina. Skuldi Jesus verða liggjandi í hesi grøvini? Nei. Nú kom størsta undrið av øllum.

— Grundað á Matteus, kapittul 26 og 27; Markus, kapittul 14 og 15; Lukas, kapittul 22 og 23; Jóhannes, kapittul 12 til 19.

- Hvørja nýggja høgtíð stovnaði Jesus?
- Hvørjar umstøður førdu til deyða Jesusar?

SERSTØÐA JESUSAR Í GUDS ÆTLAN

Deyði Jesusar hevði avgerandi týdning fyri, at Jehova ætlan varð framd. Av tí at Jesus var gitin av Guds heilaga anda, var hann føddur fullkomin og noyddist ikki at doyggja. Kortini ofraði hann sítt lív, so mannaættin kundi fáa møguleika at liva í allar ævir og gleða seg um tað lívið, sum ólýdni Ádam spilti burtur fyri sínar eftirkomarar.* — Matteus 20:28; Lukas 1:34, 35; Jóhannes 3:16, 36; 2 Pætur 3:13.

* Á síðu 47-56 í bókini *Hvat lærir Biblian veruliga?* verður greitt frá, hvussu stórt virði offurdeyði Jesusar hevur.

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus •
Markus •
Lukas •
Jóhannes •
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
• Matteus
• Markus
• Lukas
• Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv

21 Jesus livir!

Jesus vísir seg fyri lærisveinum sínum, so hann kann læra og uppbyggja teir

TRIÐJA DAGIN eftir at Jesus var deyður, løgdu nakrar kvinnur, ið vóru lærisveinar hjá honum, til merkis, at steinurin, ið var settur fyri gravarmunnan, var veltur burtur. Og grøvin var tóm!

Tveir einglar vístu seg. „Tit leita eftir Jesusi úr Nazaret,“ segði ein teirra. „Hann er risin upp.“ (Markus 16:6) Kvinnurnar runnu alt fyri eitt avstað at siga ápostlunum tíðindini. Á vegnum møttu tær Jesusi. „Óttist ikki!“ segði hann. „Farið og sigið við brøður Mínar, at teir skulu fara til Galilea! Har skulu teir síggja Meg.“ — Matteus 28:10.

Seinni sama dag fóru tveir lærisveinar til gongu úr Jerusalem til bygdina Emmaus. Ein fremmandur kom at fylgjast við teimum og spurdi, hvat teir tosaðu um. Í veruleikanum var hann tann upprisni Jesus, sum vísti seg í einum líki, teir ikki beinanvegin kendu aftur. Tungir í huga søgdu teir, at teir høvdu tosað um Jesus. Fremmandamaðurin fór at greiða teimum frá øllum tí í Skriftini, sum snúði seg um Messias. Tað var greitt, at messiasprofetiirnar úr enda í annan gingu út við Jesusi.* Tá lærisveinarnir varnaðust, at hin fremmandi var Jesus, ið var reistur upp sum andi, hvarv hann.

Teir báðir lærisveinarnir fóru alt fyri eitt aftur til Jerusalem. Har funnu teir ápostlarnar savnaðar fyri læstum durum. Meðan teir søgdu frá tí, sum hevði hent teimum, vísti Jesus seg fyri teimum. Ovfarnu lærisveinar hansara høvdu ilt við at trúgva tí! „Hví kemur ivi upp í hjørtum tykkara?“ spurdi Jesus. „So er skrivað, at Kristus skuldi líða og triðja dagin rísa upp frá hinum deyðu.“ — Lukas 24:38, 46.

Í 40 dagar eftir, at Jesus var uppreistur, vísti hann seg fleiri ferðir fyri lærisveinunum — einaferð fyri meiri enn 500! Tað var eyðsæð tá, hann gav teimum hesa týdningarmiklu uppgávu: „Farið . . . út og gerið øll fólkasløg til lærisveinar, . . . og lærið teir at halda alt, ið Eg havi boðið tykkum! Og Eg eri við tykkum allar dagar, líka til enda tíðarinnar.“ — Matteus 28:19, 20.

Seinastu ferð Jesus var saman við sínum 11 trúføstu ápostlum, gav hann teimum hetta lyftið: „Tit skulu fáa kraft, tá ið Heilagi Andin kemur yvir tykkum, og tit skulu vera vitni Míni . . . líka til enda jarðarinnar.“ (Ápostlasøgan 1:8) Síðani varð Jesus lyftur upp, og eitt skýggj fjaldi hann, so teir ikki longur sóu hann fara til himmals.

— Grundað á Matteus, kapittul 28; Markus, kapittul 16; Lukas, kapittul 24; Jóhannes, kapittul 20 og 21; Fyrra Korintbræv 15:5, 6.

* Dømi um messiasprofetiir, sum gingu út við Jesusi, eru at finna á síðu 17-19 í hesum heftinum og á síðu 199-201 í bókini *Hvat lærir Biblian veruliga?*

■ Hvussu varnaðust lærisveinarnir, at Gud hevði reist Jesus upp?

■ Hvat segði Jesus teimum báðum lærisveinunum á vegnum til Emmaus?

■ Hvørjar ávísingar gav Jesus lærisveinum sínum, áðrenn hann fór til himmals?

HEILAGI ANDIN

Guds heilagi andi er sterkasta megin í alheiminum. Jehova Gud brúkti anda sín, ella virknu megi sína, til at skapa himmalin og jørðina og til at syrgja fyri, at Biblian varð skrivað. Andin var tann megin, sum elvdi øll undrini, vit higartil hava lisið um. Teirra millum størsta undrið av øllum — uppreisn Jesu Krists til lív sum ein veldigur andaskapningur. — 1 Mósebók 1:2; 2 Sámuel 23:2; Ápostlasøgan 10:38; 1 Pætur 3:18.

36 Kornelius verður kristin

30. nisan 33 e.o.t.

6. sivan 33 Hvítusunnudagurin; úthellanin av heilaga andanum (sivan svarar til partar av mai og juni)

22 Ápostlarnir boða óttaleysir

Kristna samkoman veksur skjótt hóast atsóknir

TÍGGJU DAGAR eftir at Jesus var farin til himmals, á jødisku hvítusunnuni í ár 33, møttust umleið 120 lærisveinar í einum húsi í Jerusalem. Brádliga bleiv nógvur larmur í húsinum, sum ljóð av hørðum vindi. Lærisveinarnir fóru undurfult at tosa mál, sum teir ongantíð høvdu lært. Hvør var orsøkin til hesar løgnu hendingar? Gud hevði givið lærisveinunum heilaga andan.

Ein mannamúgva stóð uttan fyri húsið, tí gestir úr nógvum londum vóru komnir til høgtíðina. Teir gjørdust ovfarnir, tá teir hoyrdu lærisveinarnar hjá Jesusi tosa síni egnu ymisku tungumál flótandi. Pætur greiddi frá, hvat var hent; hann vísti á profetiina hjá Jóel profeti um, at Gud skuldi „úthella“ sín anda og á tann hátt geva teimum, ið fingu hann, undurfullar gávur. (Jóel 3:1, 2) Hesin stóri vitnisburðurin um virki heilaga andans vísti týðiliga, at nú var hend ein týðandi broyting: Tað var ikki longur Ísrael, men nýstovnaða kristna samkoman, ið hevði Guds tokka. Tey, sum vildu tæna Gudi á góðkendan hátt, máttu nú blíva lærisveinar Kristusar.

Ímeðan vaks mótstøðan, og nakrir fíggindar hjá lærisveinunum fingu teir settar í fongsul. Men um náttina læt eingil Jehova fongsulsdyrnar upp og beyð lærisveinunum at halda fram at boða. Og tað gjørdu teir, so skjótt sum tað lýsti fyri degi. Teir fóru inn í templið og byrjaðu at læra onnur tey góðu tíðindini um Jesus. Trúarleiðararnir vóru í øðini og buðu teimum at halda uppat at boða. Ápostlarnir svaraðu óttaleysir: „Ein eigur at lýða Gud meir enn menniskju!“ — Ápostlasøgan 5:28, 29.

Atsóknin versnaði. Nakrir jødar ákærdu lærisveinin, Stefanus, fyri at vera gudsspottara og steinaðu hann til deyða. Ein ungur maður — Saul úr Tarsus — sá og tók undir við, at Stefanus varð dripin. Hann fór síðani til Damaskus at handtaka allar lærisveinar hjá Kristusi. Meðan hann var á vegnum, skein eitt ljós av himli knappliga um hann, og ein rødd segði: „Saul, Saul! Hví søkir tú at Mær?“ Saul, ið varð blindaður av ljósinum, spurdi: „Hvør ert Tú?“ Og røddin svaraði: „Eg eri Jesus.“ — Ápostlasøgan 9:3-5.

Tríggjar dagar seinni sendi Jesus ein lærisvein, ið æt Ánanias, til Saul, fyri at geva honum sjónina aftur. Saul bleiv doyptur og fór djarvur at boða um Jesus. Saul bleiv kendur sum ápostulin Paulus og gjørdist ein íðin limur í kristnu samkomuni.

Lærisveinarnir hjá Jesusi høvdu higartil bert borið jødum og samverjum tey góðu tíðindini um Guds ríki. Men nú vísti ein eingil seg so fyri Korneliusi, einum gudsóttandi rómverskum heryvirmanni, og bað hann senda boð eftir ápostlinum Pæturi. Pætur fór, saman við nøkrum øðrum, til Kornelius og bar honum og húski hansara gleðiboðini. Ímeðan Pætur talaði, kom heilagur andi yvir hesar trúgvandi ikkijødar, og ápostulin gav boð um, at teir skuldu doypast í navni Jesusar. Nú høvdu fólk úr øllum tjóðum møguleika at koma inn á vegin, sum førir til ævigt lív. Samkoman var til reiðar at bera tey góðu tíðindini út víða hvar.

— Grundað á Ápostlasøguna 1:1–11:21.

■ Hvat hendi á hvítusunnuni?

■ Hvussu tóku mótstøðumenninir ímóti boðskapinum, ið lærisveinarnir boðaðu?

■ Hvussu bleiv møguligt hjá fólki úr øllum tjóðum at fáa ævigt lív?

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan •
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Hoseas
Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
• Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv



23 Tey góðu tíðindini verða borin út

Paulus ferðast um land og hav fyri at boða

TÁ Paulus var umvendur, boðaði hann íðin tey góðu tíðindini um Guds ríki — og nú varð fyrrverandi mótstøðumaðurin sjálvur fyri harðari atsókn. Hesin ótroyttiligi ápostulin gjørdi fleiri víðfevndar ferðir fyri at bera tey góðu tíðindini um tað ríkið, sum skuldi fremja Guds upprunaligu ætlan við mannaættini.

Í Lystra grøddi Paulus á fyrstu boðanarferð síni ein mann, sum hevði verið avlamin, síðan hann varð føddur. Fólkini fóru at fagna Paulusi og ferðafelaga hansara, Barnabasi, sum gudar, og tað eydnaðist teimum bert við neyð og deyð at forða fólkinum í at geva teimum sláturoffur. Ávirkað av fíggindum Paulusar fóru hesi somu fólkini seinni at steina Paulus, og tá tey hildu hann vera deyðan, fóru tey frá honum. Paulus yvirlivdi álopið og fór einaferð aftur til býin at styrkja og uppbyggja lærisveinarnar.

Nakrir kristnir jødar bóru fram prógrundir fyri, at trúgvandi ikkijødar høvdu skyldu at halda ávísar partar av Móselógini. Paulus legði spurningin fram fyri ápostlarnar og teir elstu í Jerusalem. Tá ið hesir menninir gjølla høvdu kannað Skriftirnar við leiðslu frá Guds heilaga anda, skrivaðu teir til samkomurnar og góvu teimum áminning um at halda seg frá avgudadyrkan, frá blóði og frá kjøti, sum blóðið ikki er runnið av, og frá siðloysi. Slík boð vóru 'neyðug', men at fylgja teimum kravdi *ikki,* at mann helt Móselógina. — Ápostlasøgan 15:28, 29.

Á aðru boðanarferð síni vitjaði Paulus í Berøa, sum liggur í nútíðar Grikkalandi. Jødarnir har í býnum tóku ímóti orðinum við ídni og rannsakaðu dagliga Skriftirnar fyri at fáa læru Paulusar váttaða. Enn eina ferð fekk hann mótstøðu og noyddist at halda leiðina fram, hesa ferð til Athen. Fyri einum bólki av lærdum í Athen helt Paulus eina máttmikla talu, sum er eitt fyrimyndarligt dømi í at vera fólkaligur, skynsamur og væltalandi.

Eftir triðju boðanarferð sína fór Paulus til Jerusalem. Tá hann fór inn í templið, bleiv ófriður millum nakrar av jødunum, sum vildu drepa hann. Rómverskir hermenn løgdu uppí og tóku Paulus við sær til avhoyringar. Sum rómverskur borgari helt hann seinni verjurøðu fyri rómverska landshøvdinganum, Feliksi. Jødarnir høvdu eingi prógv at leggja fram fyri ákærurnar, teir høvdu reist móti Paulusi. Festus, ein annar rómverskur landshøvdingi, ætlaði at senda hann til jødarnar, men fyri at forða tí segði Paulus: „Eg skjóti mál mítt til keisaran!“ Og Festus svaraði: „Tú skalt fara til keisaran!“ — Ápostlasøgan 25:11, 12.

Paulus varð so førdur umborð á eitt skip, sum skuldi til Italia, har hann skuldi fyri rættin. Skipið gekk burtur, hann strandaði á oynni Malta, og har mátti hann verða allan veturin. Tá ið hann umsíðir var komin til Róm, búði hann í einum leigaðum húsum í tvey ár. Hóast tann ídni ápostulin nú sat í varðhaldi, helt hann fram at bera øllum, sum vitjaðu hann, boðini um Guds ríki.

— Grundað á Ápostlasøguna 11:22–28:31.

■ Hvat hendi, eftir at Paulus hevði grøtt ein avlamnan mann í Lystra?

■ Hvussu varð spurningurin, um tað var neyðugt at fylgja Móselógini, loystur?

■ Hvussu bar tað til, at Paulus endaði í Róm, og hvat gjørdi hann, meðan hann var har?



24 Paulus skrivar til samkomurnar

Brøv Paulusar styrkja kristnu samkomurnar

NÝSTOVNAÐA samkoman skuldi fáa týdningarmiklan leiklut í samband við fremjanina av ætlan Jehova. Men tey kristnu í fyrstu øld vórðu skjótt fyri álopi. Varðveita tey sakloysi sítt fyri Gudi hóast atsóknir uttanífrá og aðrar, meiri lúnskar vandar inni í samkomuni? Í Kristnu griksku skriftunum eru 21 brøv við neyðugum ráðum og eggjanum.

Paulus hevur skrivað fjúrtan av brøvunum, frá Rómbrævinum til Hebrearabrævið. Brøvini eru uppkallað eftir teimum, sum tey eru skrivað til — antin einstaklingum ella limum í ávísum samkomum. Legg til merkis, hvørji evni verða viðgjørd í brøvunum hjá Paulusi.

Áminningar um moral og atburð. Tey, sum eru siðleys, fremja hjúnabandsbrot og aðrar grovar syndir, ’arva ikki Guds ríki’. (Galatiabrævið 5:19-21; 1 Korintbræv 6:9-11) Tænarar Guds mugu óansæð tjóðskap vera samdir og sameindir. (Rómbrævið 2:11; Efesusbrævið 4:1-6) Teir mugu fúsir og við gleði hjálpa trúarfelagum sínum, sum eru í neyð. (2 Korintbræv 9:7) Paulus sigur: „Biðið uttan íhald!“ Ja, tey, sum tæna Jehova, verða eggjað til at hella hjørtu síni út fyri Jehova í bøn. (1 Tessalonikabræv 5:17; 2 Tessalonikabræv 3:1; Filippibrævið 4:6, 7) Skal Gud hoyra okkara bønir, mugu vit biðja í trúgv. — Hebrearabrævið 11:6.

Hvussu kunnu familjur trívast og hava tað gott? Maðurin skal elska konu sína sum sítt egna likam. Konan skal hava stóra virðing fyri manninum. Børnini skulu akta foreldrini, tí tað dámar Gudi. Og foreldrini mugu í kærleika upplæra síni børn við Guds meginreglum. — Efesusbrævið 5:22–6:4; Kolossebrævið 3:18-21.

At skilja Guds ætlan betur. Endamálið við meginpartinum av Móselógini var at verja og vegleiða ísraelsmenn, inntil Kristus kom. (Galatiabrævið 3:24) Kristin noyðast kortini ikki at halda hesa lógina fyri at kunna tæna Gudi. Tá Paulus skrivaði til hebrearanar — sum vóru kristin, ið høvdu jødiska bakgrund — varpaði hann ljós á, hvønn týdning Lógin hevði, og hvussu Guds ætlan gongur út í samband við Kristus. Paulus greiddi frá, at nógvir partar av lógini høvdu profetiskan týdning. Dýraofrini vístu til dømis fram til offurdeyða Jesusar, sum kundi geva menniskjum sanna syndafyrigeving. (Hebrearabrævið 10:1-4) Við deyða

Paulus skrivar brøv, meðan hann situr fongslaður í Róm

61 e.o.t.

HVØR ER LOVAÐA AVKOMIÐ?

Tá Ádam og Eva høvdu syndað, segði Gud í ímyndarligum orðingum við drekan: „Eg seti fíggindskap millum teg og kvinnuna, millum títt avkom og hennara avkom; Hann skal sora høvdið á tær, men tú skalt høgga Hann í hælin.“ (1 Mósebók 3:15) Bíblian vísir, at Djevulin er tann ’gamli ormurin’. (Opinberingin 12:9) Hvør, ið skuldi verða lovaða avkom Guds, ella frelsarin, var eitt loyndarmál, sum Bíblian opinberaði so við og við gjøgnum øldirnar.

Umleið 2000 ár eftir at Ádam og Eva høvdu syndað, vísti Jehova á, at lovaða avkomið skuldi koma í ætt Ábrahams. (1 Mósebók 22:17, 18) Og fleiri hundrað ár seinni avdúkaði Paulus, at týdningarmesti parturin av avkominum var Messias, Jesus Kristus. (Galatiabrævið 3:16) Sambært Fyrstu Mósebók 3:15 varð ’hælurin’ hjá Jesusi í fluttari merking soraður, tá hann varð dripin. Men Gud reisti Jesus upp, og hann „varð gjørdur livandi í andanum“. — 1 Pætur 3:18.

Ætlan Guds var eisini, at 144.000 menniskju skuldu verða seinni parturin av avkominum. (Galatiabrævið 3:29; Opinberingin 14:1) Sum samarvingar Kristusar rísa tey upp til andaligt lív í himmalska ríkinum. — Rómbrævið 8:16, 17.

Sum veldigur himmalskur kongur fer Jesus skjótt at beina fyri Djevulinum og avkomi hansara — teimum óndu menniskjunum og illu andunum, sum fylgja Satani. (Jóhannes 8:44; Efesusbrævið 6:12) Stjórn Jesusar hevur frið og gleði við sær fyri øll, sum velja at vera Gudi lýðin. Og at enda sorar Jesus „høvdið“ á drekanum, tá hann fullkomiliga ger hann til einkis. — Hebrearabrævið 2:14.

Jóel
Amos
Obadias
Jónas
Mika
Nahum
Habakkuk
Zefanias
Haggai
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
• Rómbrævið
• 1 Korintbræv
• 2 Korintbræv
• Galatiabrævið
• Efesusbrævið
• Filippibrævið
• Kolossebrævið
• 1 Tessalonikabræv
• 2 Tessalonikabræv
• 1 Timoteusbræv
• 2 Timoteusbræv
• Titusbrævið
• Filemonbrævið
• Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
Opinberingin

Jesusar setti Gud lógarsáttmálan úr gildi, tí nú var ikki longur tørvur á honum. — Kolossebrævið 2:13-17; Hebrearabrævið 8:13.

Vegleiðing um, hvussu samkoman skuldi samskipast. Menn, ið eru fúsir at átaka sær ábyrgd í samkomuni, mugu hava høgan moral og lúka andaligu førleikakrøvini í Bíbliuni. (1 Timoteusbræv 3:1-10, 12, 13; Titusbrævið 1:5-9) Tænarar hjá Jehova Gudi mugu regluliga koma saman við sínum trúarfelagum fyri at eggja hvør annan. (Hebrearabrævið 10:24, 25) Møti, har vit koma saman at tilbiðja Gud, skulu vera uppbyggjandi og lærurík. — 1 Korintbræv 14:26, 31.

Tá ápostulin Paulus skrivaði seinna brævið til Timoteus, var hann aftur í Róm; hann sat fongslaður og bíðaði eftir at verða dømdur. Bert nøkur fá fólk vóru so djørv, at tey tordu at vitja hann. Paulus visti, at hann skjótt skuldi missa lívið. Hann segði: „Eg havi strítt hitt góða stríð, havi runnið skeiðið at enda, eri vorðin standandi í trúnni.“ (2 Timoteusbræv 4:7) Stutta tíð eftir leið Paulus eftir øllum at døma pínslarváttardeyðan. Men brøvini hjá ápostlinum leiðbeina enn í dag sannar Guds tænarar.

— Grundað á Rómbrævið; Fyrra og Seinna Korintbræv; Galatiabrævið; Efesusbrævið; Filippibrævið; Kolossebrævið; Fyrra og Seinna Tessalonikabræv; Fyrra og Seinna Timoteusbræv; Titusbrævið; Filemonbrævið; Hebrearabrævið.

■ Hvørjar áminningar um moral og atburð eru at finna í brøvunum hjá Paulusi?

■ Hvussu varpaði Paulus ljós á, at ætlan Guds verður framd við Kristusi?

■ Hvørja vegleiðing gav Paulus um, hvussu samkoman av røttum skal skipast?

61 e.o.t. **fyri 62** Jákup, hálvbróðir Jesusar, skrivar bræv sítt

25 Leiðbeining um trúgv, atburð og kærleika

Jákup, Pætur, Jóhannes og Judas skriva uppbyggjandi brøv til trúarfelagar sínar

JÁKUP og Judas vóru hálvbrøður Jesusar. Og Pætur og Jóhannes vóru tveir av teimum 12 ápostlunum hjá Jesusi. Hesir fýra menn skrivaðu tilsamans sjey brøv, sum eru í Kristnu griksku skriftunum. Øll brøvini bera navnið á honum, ið hevur skrivað tað. Innblásta áminningin í hesum brøvunum skuldi hjálpa teimum kristnu at varðveita sakloysi sítt fyri Jehova og hava Guds ríki í huga.

Vísið trúgv! Tað er ikki nokk bara at siga seg trúgva á Gud. Sonn trúgv hevur gerðir við sær. „Ja," skrivaði Jákup, „trúgvin [er] deyð uttan verk." (Jákup 2:26) At liva í trúgv, tá ið vit eru fyri royndum, styrkir áhaldnið. Skal tað gangast einum kristnum væl í lívinum, má hann biðja Gud um vísdóm og líta á, at hann gevur honum hann. Áhaldni gevur tokka Guds. (Jákup 1:2-6, 12) Varðveitir ein trúgvandi sakloysi sítt, tekur Jehova Gud ímóti honum. „Haldið tykkum nær til Gud," sigur Jákup, „so skal Hann halda Seg nær til tykkara!" — Jákup 4:8.

Trúgvin hjá einum kristnum skal vera so sterk, at hon hjálpir honum at standa ímóti freistingum og siðleysari ávirkan. Moralskt spilta umhvørvið gjørdi, at Judas kendi seg noyddan eggja trúarfelagum sínum inniliga til at „berjast fyri trúnni". — Judas 3.

Varðveitið reinan atburð! Jehova væntar, at hansara tænarar eru heilagir, tað merkir reinir, í øllum viðurskiftum. Pætur skrivar: „Tit [skulu] . . . verða heilløg í øllum atburði tykkara; tí skrivað er: 'Tit skulu vera heilløg, tí Eg [Jehova] eri heilagur.' " (1 Pætur 1:15, 16) Kristin hava eina fyrimynd, sum er verd at taka eftir. „Kristus leið . . . fyri tykkum," sigur Pætur, „og læt tykkum fyridømi eftir, so tit skulu fylgja eftir í fótasporum Hansara." (1 Pætur 2:21) Hóast kristin kanska mugu líða ilt, tí tey halda seg til Guds normar, varðveita tey eina „góða samvitsku". (1 Pætur 3:16, 17) Pætur eggjar kristnum til at hava heilagan atburð og gera nógvar góðar gerðir, meðan tey bíða eftir dómadegi Guds og lovaða nýggja heiminum, „har rættvísi býr". — 2 Pætur 3:11-13.

Vísið kærleika! „Gud er kærleiki," skrivar Jóhannes. Ápostulin ger vart við, at Gud vísti stóra kærleika sín við at senda Jesus sum „bót fyri syndir okkara". Hvussu eigur hetta at ávirka kristin? Jóhannes greiðir frá: „Tit elskaðu! Hevur Gud elskað okkum so, tá skylda eisini vit at elska hvørt annað." (1 Jóhannes 4:8-11) Ein máti at vísa slíkan kærleika er við at vísa trúarfelagum sínum gestablídni. — 3 Jóhannes 5-8.

Hvussu kunnu Jehova tænarar vísa honum kærleika? Jóhannes svarar: „Tað er kærleikin til Gud, at vit halda boð Hansara; og boð Hansara eru ikki tung." (1 Jóhannes 5:3; 2 Jóhannes 6) Tey, sum soleiðis eru Jehova lýðin, fáa vissu fyri, at hann heldur fram at elska tey og gevur teimum „ævigt lív". — Judas 21.

— Grundað á Bræv Jákups; Fyrra og Seinna bræv Pæturs; Fyrsta, Annað og Triðja bræv Jóhannesar; Bræv Judasar.

„Haldið tykkum nær til Gud, so skal Hann halda Seg nær til tykkara." — *Jákup 4:8*

- Hvussu kann ein kristin vísa sína trúgv?
- Hvønn atburð væntar Gud av tænarum sínum?
- Hvussu vísa vit, at vit veruliga elska Gud?

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin
Esaias
Jeremias
Sorgarsongirnir
Ezekiel
Dániel
Zakarias
Malakias
Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups •
1 Bræv Pæturs •
2 Bræv Pæturs •
1 Bræv Jóhannesar •
2 Bræv Jóhannesar •
3 Bræv Jóhannesar •
Bræv Judasar •
Opinberingin

1 Mósebók
2 Mósebók
3 Mósebók
4 Mósebók
5 Mósebók
Josva
Dómararnir
Rutt
1 Sámuelsbók
2 Sámuelsbók
1 Kongabók
2 Kongabók
1 Krønikubók
2 Krønikubók
Ezra
Nehemias
Ester
Job
Sálmarnir
Orðtøkini
Prædikarin
Hásongurin

26 Aftur eitt paradís!

Við ríkinum, sum Kristus er kongur í, halgar Jehova navn sítt, staðfestir fullveldi sítt og beinir fyri øllum óndskapi

SEINASTA bókin í Bíbliuni, sum kallast Opinberingin, ella Apokalypsan, gevur allari mannaættini vón. Í bókini, sum ápostulin Jóhannes hevur skrivað, eru sjónir, sum koma í hæddina, tá ætlan Jehova verður fullført.

Í fyrstu sjónini rósar og leiðbeinir tann upprisni Jesus nøkrum samkomum. Í tí næstu sjónini er Gud at síggja á himmalsku trúnu síni, umgyrdur av andaskapningum, ið lova honum.

Uppfyllingin av Guds ætlan líður fram, og Lambið, Jesus Kristus, fær eina bókrullu, sum er afturlatin við sjey innsiglum. Tá tey fýra fyrstu innsiglini verða latin upp, leypa nakrir ímyndarligir reiðmenn inn á leikpall heimsins. Tann fyrsti er Jesus, sum ríður á einum hvítum hesti og er krýndur sum kongur. Síðani koma aðrir reiðmenn á hestum við ymiskum litum, og teir umboða profetiskt kríggj, hungursneyð og pest — alt nakað, sum skal henda á teimum síðstu døgunum hjá hesi heimsskipanini. Tá ið sjeynda innsiglið verður latið upp, verður blást í sjey ímyndarligar lúðrar, og tað merkir yvirlýsingar av dómum Guds. Tær hava sjey ímyndarligar plágur, ella tekin um Guds vreiði, við sær.

Guds ríki, lýst sum ein nýføddur drongur, verður stovnað í himli. Kríggj brestur á, og Satan og óndu einglar hansara verða kastaðir niður á jørðina. „Vei jørðini," sigur ein hørð rødd. Djevulin er sera vreiður, tí hann veit, at tíðin, hann hevur, er so stutt. — Opinberingin 12:12.

Jóhannes sær Jesus í himlinum sum eitt lamb, og við honum eru 144.000, sum eru vald burtur úr mannaættini. Hesi skulu „vera kongar við" Jesusi. Opinberingin avdúkar soleiðis, at í seinna partinum av avkominum eru 144.000 limir til samans. — Opinberingin 14:1; 20:6.

Stjórnararnir á jørðini savnast til Harmageddon, „bardagan hin stóra dag Guds hins Alvalda". Teir berjast móti reiðmanninum á hvíta hestinum — Jesusi, sum ríður á odda fyri himmalska herinum. Allir stjórnararnir á jørðini verða gjørdir til einkis. Satan verður bundin, og Jesus og tey 144.000 stjórna jørðini sum kongar í „1000 ár". Tá tey túsund árini eru liðin, verður Satan gjørdur til einkis. — Opinberingin 16:14; 20:4.

Hvat hevur túsundárastjórnin hjá Kristusi og hansara samstjórnarum við sær fyri tey menniskjuni, sum velja at vera Gudi lýðin? Jóhannes skrivar: „[Jehova] skal turka hvørt tár av eygum teirra; deyðin skal ikki vera longur, og hvørki sorg, skríggj ella pína skal vera longur — tí hitt fyrra er farið." (Opinberingin 21:4) Jørðin verður eitt paradís!

Soleiðis endar Opinberingin Bíbliunnar boðskap. Við Messiasríkinum verður Jehova navn halgað og hansara fullveldi staðfest í allar ævir!

— *Grundað á Opinberingina.*

■ Hvat lýsa ímyndarligu reiðmenninir?

■ Hvørjar stórslignar hendingar fara fram, so við og við sum Guds ætlan gongur út?

■ Hvat er Harmageddon, og hvussu verður úrslitið?

„BÁBYLON HIN STÓRA"

Í Opinberingini sæst, at allur falskur átrúnaður — altso átrúnaður sum er í andstøðu við hin sanna Gud — hevur felagsnavnið, „Bábylon hin stóra". Hann verður eisini nevndur 'stóra skøkjan', tí hann sum ein skøkja selur seg til heimsins politisku veldi. Tá tann tíðin kemur, sum Gud hevur ásett, fara hesi veldini sambært Opinberingini at leggja eftir skøkjuni og drepa hana. — Opinberingin 17:1-5, 16, 17.

Matteus
Markus
Lukas
Jóhannes
Ápostlasøgan
Rómbrævið
1 Korintbræv
2 Korintbræv
Galatiabrævið
Efesusbrævið
Filippibrævið
Kolossebrævið
1 Tessalonikabræv
2 Tessalonikabræv
1 Timoteusbræv
2 Timoteusbræv
Titusbrævið
Filemonbrævið
Hebrearabrævið
Bræv Jákups
1 Bræv Pæturs
2 Bræv Pæturs
1 Bræv Jóhannesar
2 Bræv Jóhannesar
3 Bræv Jóhannesar
Bræv Judasar
• Opinberingin

Boðskapurin í Bíbliuni

YVIRLIT

1 Jehova skapar Ádam og Evu við útlitinum til at liva í allar ævir í einum paradísi. Satan háðar navn Guds og ivast í, at hann hevur rættin at ráða. Ádam og Eva taka undir við Satani í uppreistrinum, og tað hevur synd og deyða við sær, bæði fyri tey og eftirkomarar teirra

2 Jehova dømir uppreistrarfólkini og lovar, at ein frelsari ella eitt avkom skal koma, sum beinir fyri Satani og strikar allar avleiðingarnar av uppreistri og synd

3 Jehova lovar Ábrahami og Dávidi, at teir skulu blíva ættarfedrar til avkomið, Messias, ið skal ráða sum kongur í allar ævir

4 Jehova gevur profetum íblástur at boða frá, at Messias skal gera enda á synd og deyða. Saman við samstjórnarum sínum fer hann at ráða sum kongur í Guds ríki, sum beinir fyri kríggi, sjúku og eisini deyða

5 Jehova sendir son sín til jarðar og ger greitt, at Jesus er Messias. Jesus boðar Guds ríki og ofrar lív sítt. Jehova reisir hann síðani upp sum anda

6 Jehova gevur soni sínum kongsvald í himli, og hetta merkir, at teir síðstu dagarnir hjá hesi heimsskipanini eru byrjaðir. Jesus leiðir lærisveinar sínar á jørðini í heimsumfatandi arbeiðinum við at boða um Guds ríki

7 Jehova gevur soni sínum boð um at lata Ríkið stjórna jørðini. Ríkið sorar øll tey óndu stjórnarveldini, stovnar Paradísið og leiðir tey menniskjuni, sum hava verið trúføst móti Gudi, fram til fullkomileika. Tað verður staðfest, at Jehova hevur rættindi at ráða, og navn hansara verður halgað med alla

VILT TÚ GJARNA VITA MEIRA?

Hetta heftið hevur ein stuttan, innihaldsríkan samandrátt av boðskapinum í Bíbliuni. Endamálið við samandráttinum er kortini ikki at greiða nágreiniliga frá, hvat Bíblian lærir um øll evni.

Kanska hevur tú hug at vita, hvussu Bíblian svarar spurningum sum hesum: Hevur Gud umsorgan fyri mær? Hvat hendir okkum, tá vit doyggja? Hvussu verði eg eydnusamur?

Svørini til hesar og aðrar áhugaverdar spurningar eru í bókini *Hvat lærir Bíblian veruliga?,* sum Jehova Vitni hava givið út. Henda bókin er skrivað við atliti til at lesa Bíbliuna í evnum. Ein slíkur lestrarháttur hjálpir okkum at finna, hvar í Bíbliuni vit kunnu lesa um eitt ávíst evni.

Les ella tak henda lesnaðin niður, ella bið um eitt ókeypis bíbliuskeið á **www.jw.org.**

Tú kanst eisini fylla hetta oyðublaðið út og senda tað til røttu adressuna.
Ein listi við adressum í øllum heiminum er at finna á www.jw.org/fo/samband.

☐ Sendið mær bókina *Hvat lærir Bíblian veruliga?*

☐ Setið tykkum í samband við meg viðvíkjandi ókeypis bíbliuskeiði

Mál _____

Navn _____

Bústaður _____

_____

_____

_____

JW .ORG ™

Vilt tú vita meira? Vitja **www.jw.org** ella set teg í samband við Jehova vitni.

bm-FR
161222